# Frágreiðing 2003

frá Búskaparráðnum

## *Búskaparráðið*

Limirnir í Búskaparráðnum eru settir sambært lóg  XXXXXXXXXXXXXXXXXXXX
Hetta ráðið varð sett at virka frá 1.januar 2002 og situr til 31.desembur 2004.

Limirnir í ráðnum eru:

Hermann Oskarsson, Cand.Polit., formaður
Una Joensen, Cand.Merc.
Óli Samró, Cand.Oecon.
Marner Jacobsen, Cand.Oecon.
Anna Kass, Cand.Merc.
Mirjam Haraldsen, Cand.Merc.Aud.
Gunnvør Balle, Cand.Merc.

Skrivari ráðsins er Cand.Oecon.,M.Sc. Jóannes Jacobsen

# Niðurstøður og tilmæli

**Inntøkusteðgur – men ikki minking enn**

Hóast bruttotjóðarúrtøkan í 2002 var 5% størri enn í 2001, byrjaði konjunkturafturstigið longu frá ársbyrjan 2002. Miðal ársfjórðingsvøxturin í lønargjaldingum í 2002 var 1% afturímóti 4,2% í 2001.

Vøxturin í lønargjaldingunum fór at falla, men kortini hevði hetta ikki stórvegis ávirkan á keypshugin hjá húsarhaldinum í fyrsta umfari. Umsetningurin í handlunum, sum selja vørur til húsarhaldsnýtsluna, var næstan 10% størri í 2002 enn árið frammanundan. Eftir verandi gongd at døma verður húsarhaldskeypið í 2003 eini 2% størri enn í fjør, og tað er lítið meira enn prísvøxturin hevur verið á húsarhaldsvørum.

Fíggjarsparingin hjá húsarhaldum sýnist kortini at hava verið minni í 2002 enn árini frammanundan, so eftir øllum at døma høvdu borgararnir í 2002 ikki mist álitið á inntøkumøguleikarnar, men heldur minka um sparingina enn um keypið. Somuleiðis sýnast fyritøkurnar at hava varðveitt trúnna á framtíðina og minkaðu ikki um starvsfólkatalið í 2002, tí arbeiðsloysið minkaði alt árið 2002.

Støðan sýnist kortini at vera undir broyting í 2003. Keypið hjá húsarhaldinum vexur ikki eins nógv og áður, arbeiðsloysið er vaksið, inntøkurnar í summum vinnugreinum minka álvarsliga og tað almenna hevur boðað frá sparingum í 2004.

Í ár hevur lítil og ongin vøxtur verið í búskapinum, og ongi tekin eru heldur at finna í útflutningsprísum, sum boða frá, at framgongd fer at koma frá útflutningsvinnunum.

Reala afturstigið er heldur størri enn tað, sum tølini í ársins prísum vísa. Um somu tíð er nevniliga farin fram prísvøxtur bæði innlendis og uttaneftir. Lønargjaldingarnar í ár fara samanlagt at vera umleið 1% størri enn í fjør, men av tí at vøxturin í sáttmálalønum í ár var umleið 4%, so er realt talan um eitt fall í lønargjaldingum.

***Keldurnar til steðgin í konjunkturframstigi***

Avfjarðandi vøxturin í 2002 sýnist at hava tvær keldur.

Onnur er at tøka arbeiðsmegin fór at ganga undan, og at hetta tessvegna setti mark fyri, hvussu nógv virksemið kundi vaxa aftrat. Hetta sæst í tí fjarðandi vøxtrinum í heimamarknaðarvinnunum frá ársbyrjan 2002. Orsøkirnar til mangul upp á arbeiðsfólk kunnu sjálvsagt vera fleiri, men Búskaparráðið gjørdi í seinastu frágreiðing síni vart við, at tað er bráðneyðugt at fáa rúmari ræsur fyri búseting og sosialum ansingarskipanum, so at fólk lættari kunnu flyta til Føroya at arbeiða, og so at tað gerst lættari at koma út á arbeiðsmarknaðin. Vaxtrartrekleikarnir stóðu kortini ikki leingi við, tí út á árið 2002 komu

útflutningsvinnurnar í trupulleikar.

Hin keldan er minkingin í útflutningsinntøkunum, sum byrjar um somu tíð, men ikki tekur dik á seg fyrr enn seinnu helvt av 2002. Prísirnir á nógvum fiskasløgum og fleiri ymsum framleiddum fiskavørum hava verið fallandi seinastu mánaðirnar. Hetta hevur kostað bæði reiðaríum, fiskavirkjum og alifyritøkum stórar upphæddir. Haraftrat koma so stóru trupulleikarnir av ILA í alifiski, sum hava ført til neyðslakting og munandi minni útseting av smolti enn áður.

Soleiðis er konjunkturvøxturin í fyrsta umfari steðgaður av tí at innlendska tilfeingið av arbeiðsfólki gongur undan og í øðrum umfari av at útflutningsvinnurnar, serliga alivinnan, verða raktar av prísfalli og øðrum afturstigi,.

Hesi konjunkturafturstigini hava sostatt heilt natúrligar grundir og standast ikki í sama mun av bygnaðarligum skeivleikum, sum kreppan í nítiárunum. At fiskaprísirnir falla er mest natúrliga orsøkin til afturstig í føroyska búskapinum. At sjúka er í alifiski ella at minni fiskur er at fáa á landgrunninum, eru eisini so at siga natúrlig fyribrigdi í einum fiskivinnubúskapi.

At framúr góði búskaparligi byrðurin frá 1995 til 2001 førdi til at tilgongdin av arbeiðsmegi gekk undan, er eisini ein heilt natúrlig orsøk til afturstig.

***Ikki sama slag av kreppu sum í 90 árunum***

Í so máta eru ongar av orsøkunum til afturstigini í dag tey somu, sum orsakirnar til kreppuna í nítiárunum. Heldur er talan um slík afturstig, sum altíð hava verið í føroyskum búskapi og sum fara at vera, so leingi sum vit útflyta av fisk – aldan ella veiddan.

Ein annar avgerandi munur á hesum afturstigi, sum nú rakar okkum, og so kreppuni í nítiárunum er, at samfelagsbúskaparligi bygnaðurin ikki er eins avlagaður og hann var í áttatiárunum.

- Vinnuligi bygnaðurin er í mangar mátar skilabetri, enn hann var fyri 10 árum síðan. Stórar studningsskipanir eru tiknar av, veðhaldspolitikkurin er munandi broyttur og liberalisering er farin fram á summum vinnuøkjum.
- Møguleikarnir til víðfevnda rentuskattaspekulasjón eru teptir.
- Fíggjarpolitikkurin er ikki eins ábyrgdarleysur og hann var øll áttatiárini eins og vinnupolitisku intensjónirnar eru skilabetri enn tá.
- Avgerandi stór veðhald eru ikki longur, sum binda tað almenna til stórar útreiðslur, um kreppa ella afturstig raka.

Hetta saman við teim stóru inntøkunum í útflutningsvinnunum seinastu árini hevur viðført, at:

- Skuldin hjá borgarunum og fyritøkum er væl minni í dag enn fyri 10 árum síðan eins og skuldin hjá tí almenna er minni og tessvegna

fíggjarpolitiska rásarúmið størri.

- Stóra nettoskuldin hjá føroyska búskapinum til útlond er vend til nettoogn og møguleikin at hava hall á gjaldsjavnanum gevur samfelagnum heilt aðrar og betri møguleikar undir einari kreppu, enn støðan var fyri 10 árum síðani.

Hvussu koma vit so burtur úr hesum afturstigum og til vøxtur í inntøkum aftur?

At orsøkin til afturstigini er fall í útflutningsprísum, hevur sjálvandi við sær, at tað er vøxtur í útflutningsprísunum, sum skal venda gongdini. Teimum eru vit ikki harrar yvir og verða tessvegna noydd at bíða eftir betri marknaðarviðurskiftum í Europa og aðrastaðni.

Men hetta er ikki nóg mikið. Tær ábendingar, sum koma av marknaðinum um prísviðurskifti, eiga at fáa árin á framleiðslugongdina í Føroyum.

### *Bygnaðarbroytingin eigur at halda fram*

Í tíðum við konjukturafturstigi tekur spurningurin seg ofta upp, um tað almenna fyri at halda upp á arbeiðspláss skal lata kapitalstudningar til vinnutólini í einstøkum vinnugreinum í trupulleikum. Hesuferð hevur serliga verið talan um rækjuflotan og alivinnuna. Meira sjáldan er talan um at lata rakstrarstudningar ella varandi verjutiltøk, men eisini tey koma fram í kjakinum viðhvørt. Í ár hava røddir verið frammi um verju av rávørutilgongdini til fiskavirkini og studning til flutning av fiski.

Greiða svarið er, at eftirspurningurin eftir arbeiðsmegi má undir ongum umstøðum haldast uppi við at seta konkursreglurnar í útflutningsvinnunum úr gildi við studningi av ymsum slag. Reglan, um at fyritøkur, sum yvir longri tíðarskeið ikki forrenta sína nýtslu av framleiðslumiðlum, mugu fara á húsagang, er týdningarmesta spælireglan í einum marknaðarbúskapi og skal vera strangt umsitin.

Her skal leggjast áherðsla á vandamiklu avleiðingarnar av bæði kapital- og rakstrarstudningum og av øðrum verjutiltøkum. Orsøkin til at høvuðsreglan, um at ongin fyritøku- ella vinnugreinaspecifikkur studningur skal latast, má verða strangt umsitin er, at annars broytist atferðin hjá vinnulívinum soleiðis, at virksemið lagar seg ikki til broytt marknaðarlig viðurskifti.

Haraftrat kann bara væntanin um studning forða fyri skilagóðum avgerðum. Fyritøkurnar ”rokna við” stuðli frá tí almenna og taka tí ikki marknaðarsignalini í álvara. Vænta fyritøkurnar, at tað almenna rættir eina hjálpandi hánd, tá á stendur, verða tær ikki nóg varnar og nóg neyvar í íløguavgerðunum.

Í so nógv ár hevur landsstýrið latið stórar studningar, at neyðugt er at tátta í av álvara, fyri at fyritøkurnar veruliga skulu missa trúnna á almenna bjarging av virkseminum. Fullkomin steðgur er tað rætta. Um meldað verður út, at støða verður tikin til hvørt mál sær, broytast

væntanirnar hjá vinnulívi og almenningi sum heild til hvørt møguleiki er fyri at fáa almenna hjálp, tá ein fyritøka kemur í klemmu, og so broytist atferðin hjá vinnulívinum. Letur tað almenna upp fyri møguleikanum fyri, at fyritøkur kunnu satsa stórt, taka vinningin, um tað gongur væl, og senda í hvussu so er part av rokningini til landskassan, um tað gongur illa, so satsar vinnulívið meira enn skilagott er út frá reint marknaðarligum atlitum og pressar harðari á at fáa hjálp, tá tað gongur illa.

Tí eigur at vera arbeitt víðari við teim bygnaðarbroytingum, sum eru nevndar omanfyri. Fremst av øllum stendur tørvurin á at broyta regluverkini fyri fiskiskap, fiskavirking og alivinnu.

***Bæði bráðfeingis og varandi trupulleikar***

Tað er ikki vist, at prísbroytingarnar seinastu tíðina allar eru bráðfeingis. At summi fiskasløg og summar fiskavørur fara at fáa betri prís sum frá líður, er onki at ivast í. Men hinvegin eru ábendingar um, at harðari kapping verður um europeiska fiskamarknaðin komandi tíðina, tí at fiskaframleiðsla av tí slag, sum vit fáast við, í alt størri mun verður útflutningsvøra hjá londum við lægri lønarkostnaði enn vit hava.

Lágur flutningskostnaður, tøknilig menning í fátækaru londunum og frælsari handilsviðurskifti føra til, at nøgdin av fiskavørum á europeiska marknaðinum sum heild vexur og at prísurin tí fellur.

Hvat skal so henda um prísurin á fiskaflaki fellur varandi niður á eitt støði, har vit ikki kunnu vera við í kappingini?

Eitt, sum ikki henda má er, at almennur studningur ella almenn verjutiltøk skulu verja vinnuna, so at hon sleppur undan at laga seg til marknaðarligu korini.

Í londum, har fiskivinnan meira at kalla er ein marginal vinna, sum hevur týdning fyri ein part av útjaðaranum, eru betri ráð til at halda vinnuna flótandi við almennum útjaðarstudningi. Men í londum, har fiskivinnan er stór og avgerandi, eru hvørki ráð til at halda henni flótandi við almennum studningi ella ráðiligt at avlaga arbeiðs- og kapitalmarknaðirnar við almennari uppílegging.

Vit gera okkum sjálvum ein beina við at lata útflutningsprísirnar óskerdar raka framleiðaran, tí tað er styttsta leiðin til neyðugu tillagingina av framleiðslugongdini. Styttstu leiðina til vinnuliga broyting fáa vit við at lata framleiðaran av vøruni merkja prísfráboðanirnar so skjótt og ótarnað, sum til ber.

Verða tað við feskum fiskavørum – viðgjørdum ella óviðgjørdum – at vit best kunnu kappast á marknaðinum, so sleppst ikki undan, at vit fara at flyta fiskin so feskan sum til ber á marknaðin, antin sum lidnar døgverðarættir ella sum ráfisk til útlendsk virki. Tað er betri at hetta hendir skjótt og ótarnað heldur enn við einum longum millumbili við lágum inntøkum og burturoyðsli av almennum pengum.

Verður tað hinvegin ein meira mekaniserað framleiðsla av háframleiddum vørum, sum vit best kunnu kappast á marknaðinum við, so er best at lata fiskavirkini kenna tørvin á umlegging so beinleiðis sum gjørligt.

Verður neyðugt at flyta primeru flakaframleiðsluna út á sjógv, so eigur hetta eisini at kunna henda ótarnað.

Um vit í framtíðini fara at framleiða fryst flak á flakatrolarum undir Føroyum, flyta feskan fisk ella fesk fløk við flogfari á meginlandið ella framleiða lidnar døgverðarættir á hámekaniseraðum virkjum, er ikki til politiskar nevndir ella vinnuliga lobby at avgera. Tað eigur harafturímóti at vera ótarnaða kappingin um rentabilitet, sum avger hendan spurningin.

### *Minni politiska stýring – meira marknaðarbúskap*

Men veruleikin er, at kappingin um fiskin, arbeiðsmegina og kapitalin er ikki heilt ótarnað í Føroyum. Hetta hevur við sær, at tað ikki eru fráboðanirnar í prísviðurskiftum einsamallar, sum hava ávirkan á vinnuligu tillagingina, men eins nógv ella meira teir studningar, handilsforðingar ella vinnuligu avmarkingarnar, sum politiski myndugleikin hevur sett í verk.

- Fiskiskipini selja ikki ótarnað fiskin har tey fáa mest fyri hann.
- Virkingin av fiski fer bara fram á landi, tí forðing er fyri virking á sjónum.
- Fiskiskapurin fer fram við teimum førum og tí reiðskapi, sum ein politisk skipan hevur avgjørt og ikki við teimum fiskiførum, sum eru mest effektiv og kappingarfør.
- Tað eru studningar av ymsum slag, sum hava ávirkan á hvussu nógv fólk fæst um borð á fiskiskip og at arbeiða á fiskavirkjum. Somuleiðis eru ávísir studningar, sum hava ávirkan á hvar ið flakavirkini liggja.
- Tað almenna eigur meginpartin av kapitalinum í fiskavirkjunum og tað eru tí avgerðirnar í almennt settum nevndum, sum hava ávirkan á hvat ið hendir í vinnuni.

Heldur enn at herða forðingarnar eru ráðini at fara undir at gera vinnuna alla leysa av politiskari stýring. Ein umfatandi umskiping av lógarverkinum um fiskiskap er neyðug eins og neyðugt er at fult handilsfrælsi verður við fiskavørum. Allir serligir fiskivinnustudningar eiga at verða tiknir av og vinnan viðgjørd eins og allar aðrar vinnur í landinum. Einskiljing av almennum vinnufeløgum í fiskivinnuni er eisini eitt neyðugt stig í hesum sambandi.

Lógin um vinnuligan fiskiskap, sonevnda ”Fiskidagaskipanin”, peikar fram móti árinum 2004, tá gyldisskeiðið til upprunaligu loyvini, sum vóru givin í 1994, endar. Hetta høvið eigur at verða brúkt til at endurnýggja lógina, so fiskidagaskipanin gerst ein marknaðarlig skipan, har marknaðarprísur verður latin fyri fiskidagarnar. Tá fáast

fyritreytirnar upp á pláss fyri munadyggari effektivisering av fiskiskapinum. Tá skipini gjalda fyri rættin at fiska, og ræsurnar gerast rúmari og fríari í skipanini, verða tað tey mest effektivu førini og best riknu fyritøkurnar, sum fáa høvi at sleppa framat.

Viðvíkjandi alivinnuni eiga karmarnir um vinnuna at umskipast soleiðis, at allar forðingar fyri útlendskum kapitali verða avtiknar. Eru myndugleikarnir bangnir fyri, at útlendskar fyritøkur keypa føroyskar alifyritøkur av ”strategiskum” orsøkum (eitt nú fyri at niðurleggja virksemi), ber til forða fyri hesum á annan hátt. Til dømis við serligum ásetingum í sjálvum aliloyvinum. At steingja fyri útlendskum íløgum í føroyska alivinnu er í øllum førum ein vánalig loysn.

Eisini eigur tað almenna, sum eigari av firðunum at uppkrevja leigu fyri aliloyvi. Um landið regluliga uppkravdi leigu svarandi til tilfeingisrentuna, heldur enn at lata aliloyvini fyri einki, hevði eitt aliloyvi ikki verið ein gáva til útvaldar persónar. Haraftrat hevði spurningurin um, hvørt fíggingarstovnar skulu fáa loyvi at taka veð í aliloyvinum, tá blivið týdningarleysur í politiskum høpi, og heldur blivið ein spurningur um, hvat er mest praktiskt fyri raksturin av vinnuni.

***Er almenna táttingin konjunkturpolitikkur ?***

At Landsstýrið hevur sett sær politiska málsetningin at minka bruttoskuldina hjá tí almenna, verður í løtuni sett fram um konjunkturjavnandi fíggjarpolitikk. Samstundis hevur Landsstýrið boða frá sparingum, sum skulu tarna vøxtrinum í almennari fyrisiting, sum eisini verður sett fram um konjunkturjavnandi fíggjarpolitikk. Haraftrat hevur Landsstýrið í hyggju at yvirtaka málsøki og finna fíggjarligu orkuna til at umsita tey av føroysku skattapengunum.

Hetta er í sjálvum sær einki at finnast at.

Vóru tiltøkini at minka um skuldina og almennu nýtsluna hinvegin grundað í konjunkturpoli-tikkinum, so er rætt at gera vart við, at tey virka heldur til at gera konjunkturafturstigini meinari enn at verja móti afturstigi.

Sparingarnar, sum Landsstýrið hevur boðað frá, fara at virka tann vegin, at keypsorkan hjá húsarhaldinum minkar meira enn hon annars hevði gjørt, vinnuliga virksemið á heimamarknaðinum verður minni og arbeiðsloysið meira umfatandi enn tað annars hevði verið.

Búskaparráðið hevur ikki mælt beinleiðis til at Landsstýrið setir konjunkturjavnandi tiltøk í verk, men kortini skal gerat vart við, at eru nevndu búskaparligu tiltøkini hjá Landsstýrinum ein roynd at verja almennu fíggjarognina undir konjunkturafturstiginum, so er hetta skaðiligur politikkur. Um ávirkanin av niðurgongdini í nøkrum útflutningsvinnum av álvara byrjar at merkjast á eftirspurninginum eftir arbeiðsmegi í hesum vinnum er tað heimamarknaðurin, bæði tann almenni og tann privati, sum skulu halda eftirspurninginum eftir

arbeiðsmegi uppi. Støðugur heimamarknaður viðførir støðugt virksemi og harvið eisini meira støðugan arbeiðsmarknað.

Tað almenna eigur ikki at bera seg at eins og ein fyritøka, sum roynir at verja eginpeningin undir einari kreppu. Tað almenna eigur heldur at halda støðuga kós og í ringasta føri at økja um nýtsluna, tá kreppur leika á, skal tað almenna hava leiklutin sum stabiliserandi makt í búskaparligum ófriðartíðum.

At stara seg blindan upp á gjaldsjavnan og úrslitið á fíggjarlógini er annars vanligt millum bæði politikarar og fólk flest. Millum onnur hevur samgongan hevur sett sær sum mál, at fíggjarløgtingslógin skal geva avlop á hvørjum ári – og helst vaxandi avlop. Eisini úr Løgtingsins fíggjarnevnd hevur ljóðað at hon fer ikki at bera eitt fíggjarlógaruppskot niðan í Tingið, sum gevur hall.

Hetta sáðar iva um sparitiltøkini hjá Landsstýrinum veruliga eru ætlað sum liður í einari strategiskari politiskari kós um minni almenna nýtslu og um at fíggja tað almenna við føroyskum skattum eina. Heldur bendir hetta á ein illa grundaðan fíggjarpolitiskan ótta fyri úrslitinum á fíggjarlógini.

Landsstýrið eigur at vera til reiðar at hava hall á fíggjarlógini í sama mun, sum tað er til reiðar at hava avlop. Skulu konjunkturafturstig ikki raka meinari enn neyðugt er, eigur tað almenna í minsta lagi at halda eina støðuga kós í útreiðslupolitikkinum, uttan mun til um hall av og á er á landskassaroknskapinum.

Formateret

# BÚSKAPARGONGDIN

Samfelagsbúskaparliga gongdin verður í hesum broti lýst m.a. við myndum, sum eru grundaðar á hagtøl frá serliga Hagstovu Føroya. Í teimum førum, tá uppgerðirn vísir tøl fyri 2003, er talan um fyribilsuppgerð og framrokning, sum Búskaparráðið stendur til svars fyri.

### Skuldarstøðan – uttanlandsskuld

Sum mynd 1 vísir var føroyska nettoáognin uttanlands við árslok 2002 komin upp á 4,4 miljardir, sum er 40% av tøku brutotjóðarinntøkuni (TBTI)[1] og 45% av bruttotjóðarúrtøkuni (BTÚ).

Til sammetingar kann nevnast, at Noreg er tað einasta av størru norðurlondunum, sum hevur nettoogn í útlondum, sum somuleiðis er um eini 45% av BTÚ. Hini norðurlondini hava nettoskuld til útlond. Nettoskuldin roknað sum partur av BTÚ hjá Finlandi er 82%, hjá Íslandi 79%, hjá Svøríki 24% og hjá Danmark 17%.




Fíggjarskuldin uttanlands hjá tí almenna var 2 miljardir krónur netto, sum er 18% av TBTI ella 20% av BTÚ. Men áognin hjá einstaklingum, fíggjarstovnum og øðrum vinnufyritøkum er 6,5 miljardir krónur, so at samanlagda úrslitið er ein rímuliga stór nettoogn í útlondum.

At eiga nettoáogn í útlondum, hevur týdning fyri føroyska kredittvirðið og hevur við sær, at fíggjarliga rásarúmið er rættuliga stórt. At almenna nettoskuldin er 20% av BTÚ leggur í veruleikanum ongar serligar bráðfeingis avmarkingar á fíggjarpolitikkin, bæði tí at hetta er lítil skuld í samanburði við onnur lond, lítil skuld samanborið við skattagrundarlagið og ikki minst samanborið við samanløgdu áognina hjá privatum í Føroyum mótvegis útlondum.

At samfelagið er komið so skjótt úr stórari skuld til at eiga fíggjarogn uttanlands, er tekin um sera góð evni til at laga seg eftir viðurskiftunum. Fáur hevði í 1995 væntað, at Føroyar longu í 1998 fóru at eiga nettoogn í útlondum.

Men, sum sagt verður aðrastaðni í frágreiðingini, er hetta kanska bæði tekin um stóra sparing og um ov fáar íløgur í vinnunum.

### Gjaldsjavnin

Hesi seinastu nógvu árini hava vit havt avlop í viðskiftunum við umheimin. Gjaldsjavnaavlopið hevur ligið um eina miljard krónur árliga. Tað, sum pyntar mest upp á úrslitið, er sjálvsagt ríkisveitingin, sum hvørt ár hevur lagt umleið eina miljard upp á inntøkusíðu okkara, uttan at nøkur vøra ella veiting verður latin afturfyri.




Vøruhandil okkara við umheimin hevur flestu árini givið avlop, uttan tey ár, tá íløgurnar hava verið stórar og/ella fiskaprísirnir lágir. Hetta er væntandi í einum búskapi sum okkara.

Tænastuviðskiftini við umheimin geva hall á hvørjum ári. Samanlagt geva vøru- og tænastuhandilin seinastu fimm árini eitt lítið hall.

Í ár verður væntandi einki avlop á gjaldsjavnanum. Orsøkirnar eru fleiri. Ein er, at prísirnir fyri fleiri av útflutningsvørunum eru falnir munandi í 2002 og 2003, soleiðis at vit fyri somu nøgd fáa minni inntøku. Umframt at prísurin á rækjum er fallin munandi, so er laksaprísurin eisini fallin. Størstan mun ger tað helst, at prísirnir á ráfiski, flaki og fleiri hvítfiskavørum er fallin nógv.

[1] Tøk Bruttotjóðarinntøka TBTI er Bruttotjóðarúrtøkan pluss lønargjaldingar og kapitalavkast og einvegis veitingar úr útlondum.

Haraftrat kemur, at ríkisveitingin er 366 miljónir krónur minni, enn hon var frammanundan.

Ein annar háttur at siga at vit hava havt gjaldsjavnaavlop er at siga, at sparingin hevur verið ivaleysa stór til at gjalda fyri tær íløgur, sum gjørdar eru í tíðarbilinum eftir kreppuna. Tessvegna er ein stórur partur av sparingini fluttur til fíggjarogn uttanlands.

Tað ber eisini til at siga, at íløgurnar hava verið í minna lagi í mun til sparingina Tí tá havt verður í huga tey mongu árini eftir kreppuna, tá ongar ella bert fáar íløgur vórðu framdar, átti at verið tørvur á nógvum og stórum íløgum, tá kreppuárinini vóru fjarðað burtur.

Seinnu árini hava kortini stórar íløgur verið gjørdar í tunnlar og skip.

### Tjóðarroknskapurin

Árini frá 1998 til 2002 var stórur vøkstur í búskapinum. Vøksturin í BTÚ var í miðal 8,2 prosent um árið, roknað í ársins prísum.

**Mynd 3:** BTÚ í ársins prísum og vøkstur




Búskaparvøkstur verður vanliga ikki mátaður í ársins prísum, men í føstum prísvirði, fyri at vit skulu kunna siga, hvat av vøkstrinum ikki var reinur prísvøkstur. Men tjóðarroknskapur í føstum prísum er ikki gjørdur um føroyska búskapin. Vit kunnu tí ikki siga, hvussu búskaparvøksturin var, og tíansheldur samanbera hann við onnur lond ella við onnur tíðarskeið.

Væntandi verður lítil ella eingin vøkstur í 2003. Eftir lønargjaldingunum at døma – sum einans eru 1% størri enn í 2002 – og eftir útflutninginum at døma, er ikki væntandi at vøkstur verður í BTÚ. Realt verður helst minking, tí lønar- og prísvøkstur hevur kortini verið.

### Býtislutfallið

Orsøkina til framgongdina frá 1996 til 2001 finna vit fyrst og fremst í býtislutfallinum. Føroyskar útflutningsvørur fingu hægri prís í mun til prísin á innfluttu vørunum, soleiðis at fyri hvørt kilo vit útfluttu, kundu vit innflyta meira enn árið undan.

Býtislutfallið er eitt roknað lutfall millum eindarvirðisvísitøl (eindarprísir) fyri ávikavist innflutning og útflutning. Tá býtislutfallið fer upp batna viðskiftini við umheimin til okkara fyrimun, tí útfluttar vørur fáa betri prís í mun til innfluttar vørur. Tá býtislutfallið fellur, verða innfluttar vørur hinvegin dýrari í mun til útfluttar vørur.

Nærum allar broytingar í býtislutfallinum síggjast sostatt aftur sum konjunkturávirkan á føroyska búskapin. Á tann hátt gerst býtislutfallið ein fráboðan um konjunkturávirkanina uttaneftir.

Tá býtislutfallið veksur, vaksa inntøkurnar í fiskivinnuni, innlendska umfarið økist, og aðrar inntøkur vaksa við. Samstundis gerst innflutningur lutfalsliga bíligari. Øvugt gongd stendst av at býtislutfallið minkar.

Í 2002 minkaði býtislutfallið, tí prísurin á útflutningsvørunum fall, meðan lítil støðugur vøkstur var í innflutningsprísunum. Í 2003 minkar býtislutfallið helst enn meira.

**Mynd 4:** Býtislutfallið 1996 til 2002




### Útflutningur – nøgdir, virði, prísir

Samanlagt var útflutningurin fram til august mánaða í ár 11% minni í virði enn sama tíðarskeið í 2002. Einki er í løtuni sum bendir á, at støðan verður øðrvísi, tá árið er runnið. Verða skip ikki roknað uppí, verður útflutningurin 7% minni í ár enn í fjør.

Frammanundan hevur vøkstur verið í útflutningsvirðinum á hvørjum ári síðani 1998, uttan í 2002, tá hann var eitt lítið vet minni enn í 2001.



**Mynd 5:** Inn- og útflutningur ársfjórðingar 2001 til 2003

Minkingin í útflutningsinntøkum er at síggja í flestu vørubólkum í 2003. Inntøkurnar fyri feskan fisk, flak og saltfisk eru munandi minni higartil í ár enn í fjør, eins og inntøkurnar fyri laks og aðrar vørur.



**Mynd 6:** Útflutningsprísir á flaki 1995 til 2003

Yvirhøvur hava útflutningsprísirnir verið lægri í 2003 enn fyri tveimum ella trimum árum síðan. Prísirnir á ísaðum feskum fiski fóru longu at falla í 2000 og 2001, meðan prísirnir á flaki og saltfiski serliga eru falnir í 2003. Laksaprísir og rækjuprísir fóru longu at falla í 2000.

Prísirnir á saltfiski hava verið sera góðir seinastu árini, og hóast teir hava verið nakað minni í 2002 og 2003, enn teir vóru í 2001, so liggja teir meira støðugir enn flakaprísirnir.

Hvønn veg prísirnir fara komandi tíðina, er ilt at spáa um. Óvissan um prísirnar í útflutningi, er tann grundleggjandi óvissan í føroyskum búskapi, tá talan er um konjunkturgongdina.

Enn er tað so, at feskfiskaprísirnir á nærmastu europeisku marknaðunum hava stóra ávirkan á okkara egnu feskfiskaprísir. Fiskurin, sum fer óvirkaður av landinum, verður antin avreiddur beinleiðis í útlendskari havn, ella verður hann útfluttur úr føroyskari havn, eftir at hann er farin um uppboðssøluna.

Einasta forðingin fyri at avreiða beinleiðis uttanlands er kravið um, at fiskifør ikki mugu avreiða meira enn ein triðing av veiðuni uttanlands í einum trý mánaða skeiði. Hóast hetta er ein torfør regla at umsita, so er ein ávís avmarking í avreiðingini uttanlands. Kortini hevur útflutningsprísurin ávirkan á føroyska avreiðingarprísin.



**Mynd 7:** Prísur á toski 1996 til 2003

Gongdin í prísinum á ísaðari heilari hýsu líkist gongdini í toskaprísinum. Prísirnir á toski og hýsu fóru at falla í 2000 og 2001, men seinastu mánaðarnar hevur heldur gingið hinvegin.

Størri parturin av útflutninginum av feskum óvirkaðum fiski er árini frammanundan farin um føroyskan bryggjukant niður á europeiska marknaðin. Men í 2002 broyttist myndin við tað, at tann parturin, sum verður avreiddur beinleiðis uttanlands, fór upp um útflutta partin.

**Innflutningur**

Innflutningurin í ár er merktur av, at innflutt er fyri nærum eina miljard krónur í skipum. Vegna tess verður væntandi hall á handilsjavnanum svarandi til skipainnflutningin, tí restin av uttanlandshandlinum so at siga javnvigar.

Innflutningur til framleiðslu í ymsu vinnunum, eitt nú byggivinnuni, er munandi minni í ár enn í fjør. Stóri vøksturin í hesum slag av innflutningi helt longu upp at í fjør, og í ár verður væntandi minni innflutt til framleiðslu.

Innflutningur av maskinum og arbeiðstólum er hinvegin meira í ár enn í fjør. Javnur vøkstur var í hesum førtunum av innflutninginum frá 1995 til 2002, men í 2002 og 2003 er vøksturin hildin upp at og er vendur til minking.




Innflutningur til beinleiðis nýtslu í húsarhaldinum er higartil í ár minni enn sama tíðarskeið í fjør, og tað er fyrstu ferð í nógv ár, at tað hendir. Somuleiðis er innflutningurin av persónbilum minni í ár, so at samanlagt eru tekin um størri varsemi í keypshuginum hjá húsarhaldinum enn verið hevur árini frammanundan.

At innflutningur til húsarhaldsnýtslu hevur staðið í stað í tvey ár, er ikki so løgi, tá havt verður í huga, at inntøkurnar eru minni og at útlitini eru óviss.

## Prístal

Yvirhøvur er brúkaraprístalið í dag eitt beinari mát av nýtslusamansetingini enn tað gamla brúkaraprístalið var. Nýggja brúkaraprístalið er grundað á eina nýtslu-kanning, sum samsvarar við húsarhaldsnýtsluna í 1998, meðan gamla brúkaraprístalið varð grundað á nýtsluna hjá einum serstøkum slag av húskjum í 1972.




Munurin er bæði, at nýtslusamansetingin sum heild er broytt munandi, og at nýggja prístalið gevur eina mynd av miðal nýtsluni hjá øllum íbúgvunum, heldur enn bara einum parti av teimum.

Síðani nýggja brúkaraprístalið á sumri 2001 varð sett í gildi, er tað vaksið lítið og einki – frá 100 til 101,5 í tvey ár. At brúkaraprístalið er vaksið so lítið stendst av tveimum ávum.

Haraftrat kemur, at nakrir prísir eru munandi minni nú enn fyri tveimum árum síðan. Olja kostar munandi minni í dag, telefonprísir og aðrir samskiftisprísir eru eisini minni, eins og rentan á sethúsalánum er fallin nógv.

Serliga eru tað útreiðslurnar av at sita í egnum húsum, sum eru minkaðar nógv og draga prístalsvøksturin niður. Rentugjalding-arnar eru ein stórur partur av útreiðslunum hjá miðal húskjum, hóast tað kortini eru nøkur húsarhald, sum merkja rentufallið minni enn onnur, til dømis húsarhald við útgoldnum húsum ella sum leiga hús ella íbúð.

## Arbeiðsloysi

Sum myndin niðanfyri vísir, er talið av skrásettum arbeiðsleysum (umroknað til fulltíðarstørv) tað lægsta, síðani vit eru farin at skráseta arbeiðsloysið. Her eru tey, sum eru í fiskavirkisskipanini ikki tald við.




Á myndini er arbeiðsloysið øll árini gjørt upp sum ársmiðal av talinum av arbeiðsleysum, sum fáa vanligt útgjald, uttan í 2003 tá tað er gjørt upp eftir august mánaða, tá 486 fólk vóru arbeiðsleys. Miðaltalið fyri skeiðið januar til august 2003 er 510 arbeiðsleys.

Øll árini síðani 1995 er talið av arbeiðsleysum fallið, uttan í ár. Fyrivarni skal kortini takast, av tí at 2003 er ikki at enda komið enn, og at tølini tí kunnu broytast nakað. Men trúligt er kortini, at arbeiðsloysið í ár valla gerst minni enn í fjør – bæði tí at talið av arbeiðsleysum helst er so lágt sum tað kann verða, og tí at vánirnar eru verri í ár enn í fjør.

At fá tarnandi mørk eru at flyta millum arbeiðspláss, vinnugreinir og øki í landinum til at finna sær inntøkumøguleikar er ein fyrimunur fyri búskapin sum heild og fyri tann einstaka. Hetta er ein fyrimunur, vit

hava fram um fleiri onnur lond, og hetta er ein fyrimunur, sum tryggjar flest fólkum arbeiði undir teimum búskaparumstøðum, sum til eina og hvørja tíð eru galdandi.

**Fólkatal**

Burðartíttleikin – talið av børnum, sum 1.000 kvinnur kunnu væntast at eiga, meðan tær eru í burðardyggum aldri – er høgur í Føroyum sammett við onnur norðurlond. Burðartíttleikin var í fjør roknaður at vera 2.540. Til sammetingar kann sigast, at bara Grønland av hinum norðurlondunum liggur omanfyri 2.000. Í Íslandi hevur burðartíttleikin seinastu árini ligið um tey 2.000, í Danmark er hann niðan fyri 1.800, meðan hann í Svøríki er komin niður í móti 1.600.

Burðatíttleikin í Føroyum hevur verið fallandi síðan 1970, men seinastu 10 árini hevur hann kortini verið meira at kalla støðugur.

Myndin niðanfyri vísir nettoflytingina og burðaravlopið, t.e. tal av føddum minus tal av deyðum, fyri skeiðið 1996 til 2003.




Tann burturflytingin, sum var árini frá 1989 til 1995, er helst ein orsøk til, at heimflytingin hevur verið so stór hesi seinastu árini. Nettoflytingin til Føroya vaks ár undan ári frá 1996 til 2001, tá tað fluttu 560 fólk fleiri til Føroya enn tað fluttu úr landinum. Í 2002 var nettotilflytingin nakað minni, 408 fólk, og í 2003 kemur hon væntandi ikki upp á 300.

Búskaparráðið gjørdi í fjør vart við tann trupulleikan, at korini hjá teimum, sum antin ætla sær út á arbeiðsmarknaðin, ætla at seta búgv ella ætla sær at flyta heim til Føroya, eru ov vánalig.

Møguleikarnir til at fáa bústað og ansingarpláss til børn og gomul eins og samferðsluviðurskiftini, eru avgerandi fortreytir, tá húski taka støðu til flyting og arbeiðsluttøku.

Men bústaðarkorini eru valla einasta orsøkin til fjarðandi nettotilflytingina. Helst eru tað inntøkuvánirnar, sum hava størra týdningin í løtuni. Minkandi inntøkur í fleiri vinnum hava við sær, at størri fráflyting er, og at tað samstundis eru færri sum flyta til Føroya.

Men tá búskaparligu viðurskiftini fara at batna aftur, verður tað umráðandi, at nevndu trivnaðar- og bústaðar-viðurskifti verða bøtt, fyri at landið skal kunna taka ímóti nýggjum íbúgvum – tilfluttum eins og nýføddum. Somuleiðis eru hetta neyðugar fortreytir fyri at fáa fólk leys heimanífrá til arbeiðis.

**Útflutningsvinnurnar**

Í miðal øktist lønarútgjaldingin í útflutningsvinnunum – fiskiskapi, alivinnu og fiskavirkjum – umleið 9% um árið 1998 til 2002. Lønarútgjaldingarnar í fiskiskapi øktust í miðal 7% um árið, í alivinnuni 19% og í fiskavirking 10%.

Men fyrstu 8 mánaðarnar av 2003 eru lønargjaldingarnar í miðal 10% minni í útflutningsvinnunum enn sama tíðarskeið í fjør. Mest er fallið á alivirkjunum – 17%, meðan fallið er 13% í fiskiskapi og umleið 1% á fiskavirkjum.

**Fiskiskapur og konjukturgongdin**

Fiskiskapur er mest umskiftandi vinnan í Føroyum, og av tí at hon er ein so stór vinna, hava sveiggini í úrtøkuni í fiskiskapi rættuliga stóra ávirkan á konjukturstøðuna. Flestu konjuktursveiggj í føroyska búskapinum skyldast stoytir til inntøkuskapanina í útflutningsvinnunum og serliga í fiskiskapi. Hetta merkir eisini, at pláss í landinum, har stórur partur av inntøkuskapanini er tengdur at fiskiskapi merkja sveiggini serliga týðiliga, tí inntøkuskapanin verður beinleiðis ávirkað.

**Fiskiskapur**

Veiðan undir Føroyum hevur verið rættuliga støðug hesi seinastu árini. Prísirnir hava verið framúr góðir, so úrtøkan hjá bæði skipum og manningum hevur verið góð fram til 2001. Men í 2002 og aftur í ár hava fallandi prísir ført til lægri úrtøku hjá øllum pørtum.




Prísirnir fyri fleiri av fiskasløgunum, sum heimaflotin avreiðir, hava verið sera lágir seinasta árið. Serliga upsaprísirnir og hýsuprísirnir hava verið lágir. Prísurin fyri tosk fall munandi í 2001, og kom síðani nakað upp aftur. Inntøkurnar hjá feskfiskaskipunum hava tí verið slakari seinasta árið enn tíðina frammanundan.

Sama er støðan hjá rækjuskipunum, meðan skipini, sum fiska uppisjóvarfisk hava havt bæði góðan fiskiskap og góðar prísir.

**Alivinna**

Alivinnan hevur stórar trupulleikar í løtuni. Lækkandi heimsmarknaðarprísir á alifiski eru ein høvuðsorsøk til trupulleikarnar í alivinnuni. Prísurin hevur í longri tíð ligið undir framleiðslukostnaðinum hjá føroysku alifyritøkunum, soleiðis at alararnir hava mist pening upp á hvørt kilo av framleiddum laksi. Viðmerkjast má, at føroysku alararnir sammett við alarar í flestu øðrum londum hava kappingarføran framleiðslukostnað, so flest allir alarar missa pening í verandi marknaðarstøðu. Í samband við sammetingar av rakstrarúrslitum millum alarar í ymsum londum má takast hædd fyri, at gjaldoyrakursir hava eina ávísa ávirkan. Til dømis hava norskir alarar seinastu tíðina havt fyrimun av, at norska krónan er viknað nakað mótvegis flestu øðrum gjaldoyrum. Hetta er tó ikki nakað, sum alararnir, hvørki í Noreg ella aðrastaðni, sjálvir hava nakra ávirkan á.

Orsøkin til lágu prísirnar er stóri vøksturin í útboðnum seinastu tvey árini. Eftirspurningurin veksur framvegis 3-5% um árið, men ógvusligi vøksturin í útboðnum av laksi á heimsmarknaðinum hevur trýst prísin niður um framleiðslukostnaðin. Hesin vøkstur í útboðnum skyldast stóru útsetingini í 2000 og 2001 kring um í heiminum, sum aftur komst av høgu prísunum hesi bæði árini. Generelt er ein høvuðsorsøk til stóru prísssveiggini langa framleiðslutíðin, sum ger, at tað tekur langa tíð hjá framleiðarunum at stýra útboðnum.

Í alivinnuni er nøgdin -í hvussu so er lutvíst- avgjørd av prísinum, soleiðis at tá prísirnir lækka, minkar framleiðslan. Í mun til flestu aðrar vinnur tekur hetta tó langa tíð í alivinnuni, vegna langu framleiðslutíðina. Einstaki alarin hevur sostatt avmarkaðar møguleikar fyri at stýra framleiddu nøgdini, meðan prísin á heimsmarknaðinum hava einstøku alararnir ella føroyingar sum heild lítla ella onga ávirkan á.

Í ár eru bara umleið 7 milliónir smolt sett út í mun til 18 milliónir í fjør. Hetta merkir, at um 2 ár, tá útsetingin í ár skal heystast vera bara umleið 20 túsund tons av laksi (rund vekt) tikin móti 45 túsund tonsum í ár. Serliga lágt er talið, um hugsað verður um, at vinnan fyri nøkrum fáum árum síðan hevði ætlanir um at hava eina árliga framleiðslu upp til 50 túsund tons og meira.

Seinastu tíðina hava tekin verið um, at tað møguliga er við at koma vend í. Heimsmarknaðarprísurin á alilaksi er komin upp móti ella upp um framleiðslukostnaðin, so tær bestu alifyritøkurnar nú aftur vinna pening upp á raksturin. Tað er enn ov tíðliga at siga, hvør ella hvørjar orsøkirnar eru, og tí er eisini ov tíðliga at siga um prísurin fer at halda sær.

**Flakavinnan**

Flakavirkini fáa helst eitt trupult ár. Fólk í vinnuni vænta, at flakavirkini samlað fara at hava eitt úrslit um 0 krónur í ár. Hetta skal samanberast við nøkur góð ár, har serliga 2001 og 2002 vóru rættuliga góð ár við umleið 50 milliónum krónum í samlaðum vinningi í vinnuni eftir skatt.

Løngjaldingarnar á flakavirkjunum fyrstu 8 mánaðirnar í ár hava verið 254 milliónir krónur, t.e. stórt sæð tær somu, sum fyrstu 8 mánaðirnar í fjør, tá løngjaldingarnar vóru 255 milliónir krónur. Hetta avspeglar, at nógvur fiskur kemur upp á land, so virksemið í flakavinnuni er nakað tað sama sum í fjør, hóast úrtøkan hjá virkjunum er minni. Her má hugsast um, at flakavirkini lógu still í fimm vikur í vár vegna verkfall. Hinvegin var arbeitt nógv uppundir verkfallið, tí virkini vóru greið yvir vandan fyri einum verkfalli. Talið av størvum í flakavinnuni hevur tí helst verið umleið tað sama í ár sum í fjør.

Fyri konjunkturstøðuna sum heild kann tí sigast, at støðan í flakavinnuni ikki er viðvirkandi til vøkstur í inntøkuskapanini, men heldur ikki til nakra kreppu á samfelagsstigi.

**Heimamarknaðarvinnurnar**

Samanlagt hevur vøkstur verið í inntøkunum, sum verða skrásettar í samtíðarskattaskipanini, ár um ár síðan 1994. Um vøkstur verður í 2003 í mun til 2002 er enn ov tíðliga at siga, men hann verður lítil. Higartil í ár eru inntøkurnar ikki meira enn 1% størri enn í fjør.




Árligi miðalvøksturin í lønargjaldingunum frá 1998 til 2002 var næstan 10%. Leggja vit árið 2003 aftrat og rokna miðal árliga vøksturin, er hann kortini 8% um árið seinastu 5 árini.

Vøksturin í lønargjaldingum hevur verið mestur í privatu heimamarknaðarvinnunum, meðan vøksturin í lønargjaldingunum í tí almenna hevur verið meira støðugur. Mest óstøðug hevur gongdin verið í útflutningsvinnunum.

Vøkstur hevur verið í flestu vinnum á heima-marknaðinum, so sum í handilsvinnuni, byggivinnuni, flutningsvinnu og vinnuligum tænastum. Serliga stórur vøkstur hevur verið í lønargjaldingum á gistihúsum og matstovum, hóast hendan vinnan er lítil í mun til aðrar.

Miðal árligi vøksturin í lønargjaldingunum í byggivinnuni var yvir 16% fram til 2002, men væntandi verður vøksturin í 2003 ikki meira enn 1%.

Sum nevnt verður í frágreiðingini, er tað av stórum týdningi, at heimamarknaðarvinnan og tað almenna ikki av politiskum ávum verða steðgað í vøkstrinum, tí hesar vinnurnar eru tær, sum skulu stabilisera inntøkuskapanina í samfelagnum, tá afturgongd er í vinnum, sum framleiða til útflutnings.

Tá útlendski eftirspurningurin eftir føroyskari framleiðslu svíkur, er tað heimamarknaðurin sum skal halda eftirspurninginum á føroyska arbeiðs-marknaðinum uppi. Í hesum sambandi er tað vert at minnast til, at ein støðugur heimamarknaður eigur at verða sæddur í einum positivum ljósi, heldur enn at síggja tað sum nakað negativt. Stabilur heimamarknaður gevur javnari konjunkturgongd, enn um alt skuldi verið líka óstøðugt sum útflutningsvinnurnar. Ein møgulig negativ ávirkan á gjaldsjavnan eigur ikki at vera orsøk til politisk tiltøk, sum hava til endamáls at minka um virksemið í heimamarknaðarframleiðslu, tá virðisøkingin í útflutningsvinnunum minkar eitt tíðarskeið.

## Tað almenna

Tað almenna í Føroyum er fyrst og fremst heimastýris-fyrisitingin. Haraftrat koma kommununar, almennir grunnar – so sum ALS og Sjúkrakassar - og fyrsitingin av ríkisstovnum – so sum ríkisumboð og annað.

Nýtslan hjá tí almenna samanlagt er vaksin um 9% um árið hesi seinastu 5 árini. Nýtslan er kostnaðurin av at framleiða og veita almennu tænasturnar. Lønarkostnaðurin er nógv størsti parturin av útreiðslunum, og hann er vaksin umleið 8,7% um árið í miðal. Av hesum er vøksturin í sáttmálalønum og lønarglíðing ein partur, meðan restin so er vøkstur í talinum av almennum starvsfólki.

Hóast heimastýrisfyrisitingin er nógv tann størsti parturin av tí almenna, so eru tað kommunurnar, sum hava havt størsta vøksturin seinastu árini – í miðal 14% um árið síðani 1998




Ein samanburður við Ísland og Danmark vísir, at almenna nýtslan er minni í Føroyum, roknað upp á íbúgvan í 1998-US$.

Ein slík samanbering má tó nýtast varisliga, tí ymisk viðurskifti gera, at tað er trupult at gera neyvar samanberingar millum lond. Samanberingin eigur helst ikki at takast longur enn at siga, at myndin vísir, at almenna nýtslan er á umleið sama støði í teimum trimum londunum.

Eitt annað myndin vísir er, at gongdin við vaksandi almennari nýtslu er tann sama í øllum trimum londunum. Vøksturin í almennu nýtsluni, roknað upp á íbúgvan var í miðal 10% í Íslandi, 5% í Danmark og 8% í Føroyum hesi árini.

Ein orsøk til vøksturin í almennari nýtslu í Føroyum er sjálvsagt, at fíggjarliga rásarúmið er vorðið størri eftir kreppuna.

Men ikki minni týdning hevur tað havt, at skipanin av ovastu myndugleikunum í heimastýrisfyrisitingini

tekur dik á seg í 1998 og árini eftir. Tað er frá hesum ári at rokna, at tey einstøku ráðini verða skipað og mannað til ta fyrisiting, vit kenna í dag.

Samanløgdu almennu útreiðslurnar eru: almenna nýtslan, veitingar til borgarar og feløg, rentugjaldingar, íløgur og kapitalstudningar.

Almennu útreiðslurnar eru vaksnar 6% í miðal um árið.

Av hesum eru íløgur og kapitalstudningar vaksin mest, meðan rentuútreiðslurnar eru minni í 2002, enn tær vóru í 1998. Útreiðslurnar til veitingar – tað eru almanna-veitingar til borgarar og rakstrarstudningar til fyritøkur og feløg – hava staðið nærum í stað hesi árini.

Vøksturin í almennu útreiðslunum er kortini mest ávirkaður av vøkstrinum í almennu nýtsluni, sum er nógv tann størsti parturin av útreiðslunum.

### Húsabygging, húsasølur, húsaprísir

Broyting í avgerðini hjá húskjunum um at seta búgv er eitt av fyrstu teknunum um broyting í konjunkturinum.




Árini frá 1975 til 1990 vóru bygd í miðal omanfyri 300 sethús um árið. Bara í Havn var árliga miðal sethúsabyggingin omanfyri 100 hesi árini. Hetta sýnist at vera talið á sethúsum, sum neyðugt er at byggja undir vanligum umstøðum. Undir kreppuni vóru bygd fá sethús, og eftir kreppuna er enn einki ár bygt omanfyri 200 sethús.

Tørvurin hevur verið nógv størri hesi seinastu árini, men av tí at lítil útstykking hevur verið – serliga í Havn – er prísurin á seldum sethúsum farin høgt. Nú eru nýggjar útstykkingar í Havn, sum helst taka nakað av trýstinum av prísunum á seldum sethúsum.

Men væntandi er tørvurin ikki nøktaður enn, so tørvur verður helst á fleiri útstykkingum.

Í 2003 sýnist steðgur at vera komin í sethúsaprísirnar í Havn. Steðgur var eisini í sethúsaprísunum í 2001, men tað árið fóru prísirnir í Havn upp við 15 prosentum, meðan teir fullu á bygd. Í 2003 er øvugt – prísirnir á bygd fara upp, meðan prísirnir í Havn falla.




Fleiri viðurskifti ávirka prísgongdina. Ein orsøk er helst tann, at útstykkingarnar í Havn taka nakað av trýstinum av sethúsaprísunum. Ein onnur orsøk kann vera, at inntøkuvánirnar ikki eru eins góðar og tær hava verið, og at tað bæði leggur eitt loft á lánimøguleikarnar og hugin at binda seg til stór lán.

Fleiri viðurskifti ávirka prísgongdina. Ein orsøk er helst tann, at útstykkingarnar í Havn taka nakað av trýstinum av sethúsaprísunum. Ein onnur orsøk kann vera, at inntøkuvánirnar ikki eru eins góðar og tær hava verið, og at tað bæði leggur eitt loft á lánimøguleikarnar og hugin at binda seg til stór lán.

Ein triðja orsøk kann vera tann, at síðani undirsjóvar-tunnilin til Vágarnar lat upp, er møguleikin at búseta seg uttan fyri Havnina batnaður hjá teimum, sum hava arbeiði í Havn.

### Húsarhaldsnýtslan

Umsetningurin í handlum, sum selja til húsarhaldið, er framvegis vaksandi. Vøksturin í 2001 var um 6,5% í mun til 2000, og í 2002 vaks umsetningurin umleið 9% í mun til 2001. Umsetningurin fyrsta ársfjórðingur í 2003 var 8% størri enn fyrsta ársfjórðing 2002.

Her er talan um matvøruhandlar, klædna- og skógvahandlar, hvítvøruhandlar, aðra smásølu, gistihús og matstovur. Tølini eru árstíðarjavnað.

Vanliga húsarhaldsnýtslan broytist ikki eins ógvusliga og eins brádliga og inntøkurnar hjá húsarhaldinum. Men nú eina tíð eftir, at inntøkuvøksturin nærum er hildin uppat samanlagt, er við at vera komin sami steðgur í nýtsluna.

Enn eru eingi álítandi tøl tøk fyri 2. og 3. árfjórðing í 2003 fyri MVG umsetningin í smásølu, men eftir innflutninginum at døma er steðgur komin í vøksturin av sølu til húsarhaldsnýtsluna.




Fyrstu 7 mánaðarnar av 2003 var innflutt 1% minni til beinleiðis húsarhaldsnýtslu í mun til sama tíðarskeið í 2002. Ein partur av minkingini stendst kortini av verkfallinum, sum var í mei og juni í ár. Um innflutningurin samanlagt til húsarhaldsnýtslu í ár fer at vera minni enn í fjør er enn óvist. Men tað er lítið, sum bendir á, at nakar vøkstur verður.

Nýtslan hjá húsarhaldinum er sjálvsagt undir beinleiðis ávirkan av inntøkunum hjá húsarhaldinum, men ávirkanin verður altíð nakað seinkað. Orsøkin er, at tá inntøkurnar falla, ávirkar tað fyrst sparingina eina tíð, og síðani ávirkar inntøkumissurin nýtsluna, tá ein tíð er fráliðin.

At døma eftir innlánum til føroysku peningastovnarnar, er steðgur komin í sparingina um ársbyrjan 2002. Tað kunnu vera onnur viðurskifti, sum hava ávirkan á innlánini, eitt nú at kapitalvinningsskattalógin er broytt soleiðis, at uppsparing uttanlands nú er skattliga javnsett við uppsparing í Føroyum.

Men at ongin vøkstur hevur verið í innlánum síðani januar 2002 er helst tekin um, at versnandi inntøkurnar hava í fyrsta umfari havt árin á sparingina hjá húsarhaldum og fyritøkum.



# Bygnaðarviðurskifti

## Marknaðirnir fyri framleiðslumiðlar

Samlaða virðisøkingin í samfelagnum kemur frá arbeiðnum hjá framleiðslumiðlunum. Hesir eru arbeiðsmegi, kapitalur og náttúrutilfeingi. Marknaðir fyri vørur og tænastur koma og fara, framleiðslustøð, t.e. virkir og stovnar, somuleiðis, og framleiðsluhættir broytast. Men arbeiðsmegin, kapitalurin og náttúrutilfeingi eru grundleggjandi miðlarnir, sum framhaldandi skulu skapa ta virðisøking, sum er grundarlagið undir livistøðinum her á landi.

Um nýggjar og tíðarhóskandi fyritøkur skulu sleppa framat, er neyðugt, at tær fáa loyvi at draga arbeiðsmegi og kapital frá fyritøkum, sum tíðin er farin frá. Tað vil siga, at fyri framdriftina í búskapinum er tað ógvuliga umráðandi, at myndugleikarnir ikki við studningi ella á annan hátt royna at halda framleiðslumiðlum føstum í ávísum fyritøkum ella vinnugreinum. Tí er sera umráðandi at regluverkini eru skipaði soleiðis, at fyritøkur, sum tað ikki er búskaparligt grundarlag undir, fara á húsagang. Reglan um at fyritøkur fara á húsagang, um tær yvir eitt longri tíðarskeið ikki klára at forrenta sína nýtslu av framleiðslumiðlum, er mest grundleggjandi spælireglan í einum marknaðarbúskapi, og er hon ein avgerandi fortreyt fyri framhaldandi drívmegi og endurskapan í einum sunnum búskapi. Kreppan í 90unum fer altíð at standa sum eitt minni um, hvussu galið tað kann ganga, tá henda spæliregla ikki verður yvirhildin.

Vælskipað marknaðarumhvørvið er ein av grundarsteinunum í einum marknaðarbúskapi. Ein høvuðsuppgáva hjá politisku myndugleikunum á búskaparpolitiska økinum er tí at seta regluverk um teir einstøku marknaðirnar, soleiðis at marknaðarumhvørvið virkar so væl sum til ber, t.e. skapar so nógva kapping sum gjørligt. Kapping elvir í sínum lagi til príssignal, ið geva so rætta informatión um búskaparliga virðið á vøruni, ið verður handlað á hesum marknaðinum, sum til ber. Jú størri kapping, jú rættari príssignal. Tað eru hesi príssignal, ið avgera, hvussu nógv verður framleitt av teim ymsu vørunum, við at geva fyritøkum tilskundan at flyta framleiðslumiðlarnar yvir í tær vinnur, har tær geva størst avkast,

Allar politiskar spælireglur fyri virkseminum á marknaðinum koma aftrat teimum, sum finnast frammanundan, til dømis náttúrligar og tøkniligar bindingar. Í nøkrum førum er bara neyðugt at fastleggja nakrar grundleggjandi politiskar spælireglur, eitt nú at staðfesta hvør hevur ognarrætt til hvat. Men í flestu førum er haraftrat neyðugt við meira útbygdum ”spælireglum” fyri at marknaðarumhvørvið skal virka nøktandi.

Studningur vil í allarflestu førum avlaga príssignalini, heldur enn viðføra rættari príssignal, soleiðis at tey ikki geva rætta informatión um samfelagsbúskaparligar fyrimunir og kostnaðir við virksemi á tí einstaka marknaðinum. Hetta viðførur beinleiðis vælferðartap og sum frálíður eisini ein verri virkandi búskap, við tað at framleiðslumiðlar verða hildnir í framleiðslu við minni samfelagsligari virðisøking enn møguleiki er fyri aðrastaðni. Studningur, beinleiðis ella óbeinleiðis, er tí í allarflestu førum ein regla, ið politisku myndugleikarnir skulu halda seg burtur frá.

### Arbeiðsmarknaðurin

**Karmarnir um arbeiðsmarknaðin**

Ein sera týdningarmikil marknaður fyri flestu borgarar og fyri føroyska búskapin sum heild er innlendski arbeiðsmarknaðurin. Á nógvum økjum manglar nágreinilig vitan um, hvussu tann føroyska arbeiðsmarknaðin virkar, men á einum øki kunnu vit síggja, at føroyski arbeiðsmarknaðurin virkar væl. Samanborið við onnur lond her um leiðir er sera stórur mobilitetur tvørtur um faklig og geografisk mørk, t.e. at arbeiðsmegin í stóran mun sleppur og fer, har tað er

eftirspurningur eftir henni. Eitt prógv um hetta er arbeiðsloysið upp á 2.7%, sum er sera lágt. Til samanberingar kann nevnast, at í flestu londum er tað vegna forðingar av ymsum slag nærum ógjørligt at fáa arbeiðsloysið niður um 4-5%.

Fyri ein vælvirkandi búskap er tað av alstórum týdningi, at halda fast við henda smidleika, og har tað er møguligt, gera hann enn størri. Regluverkini um arbeiðsmarknaðin eiga at vera skipað soleiðis, at arbeiðsmegin so vítt gjørligt alla tíðina er har, sum hon gevur størst íkast til búskapin. Fyri at hendan tillagingin við flyting av arbeiðsmegi skal ganga smidliga, er sera týdningarmikið, at arbeiðsmarknaðurin virkar væl, soleiðis at arbeiðsmegin hevur so lætt sum gjørligt við at flyta, har eftirspurningur er eftir henni.

Størsta politiska forðingin á føroyska arbeiðsmarknaðinum fyri, at arbeiðsmegin verður gagnnýtt har, hon gevur størst íkast til búskapin, er hugsjónin um, at arbeiðspláss í útflutningsframleiðslu eru betur og meira verd enn arbeiðspláss í heimamarknaðarvinnum. Hugsjónin er skeiv, og av henni standast studningar og onnur tiltøk, sum halda arbeiðsmegi í útflutningsvinnum, tá arbeiðsgevarar aðrastaðni í búskapinum høvdu kunnað bjóða betri sømdir, um fríar marknaðartreytir ráddu, tí arbeiðsmegin er meira produktiv hjá teimum. Hugsjónin eigur tí ikki at vera leiðbeinandi fyri almenna politikkinum á økinum.

Haraftrat er neyðugt, at heimamarknaðurin ikki verður trýstur óneyðugt niður av einum politiskum málsetningi um avlop á fíggjarlóg og gjaldsjavna. Tá eftirspurningurin uttanífrá svíkur, sum hann partvís ger í løtuni, er tað heimamarknaðurin, bæði tann almenni og tann privati parturin av honum, sum skal halda framleiðsluni og harvið framleiðslumiðlunum í gongd.

Útyvir almenna politikkin á økinum eru reglurnar hjá ALS ein partur av regluverkinum fyri arbeiðsmarknaðin. Tað er týdningarmikið, at tað framhaldandi verður kravt, at fólk skulu kunna taka arbeiði um alt landið. Hetta kravið er sjálvandi rímuligari og lættari at halda fast við, um infrastrukturin er góður. Tí er tað av avgerandi týdningi, at infrastrukturin er nútíðarhóskandi. Samanbinding av so stórum parti av landinum sum gjørligt, so vit so vítt gjørligt hava ein landsumfatandi arbeiðsmarknað heldur enn fleiri lokalar arbeiðsmarknaðir, er kanska týdningarmesti vinningurin av betri infrastrukturi. Eitt gott dømi um hetta er undirsjóvartunnilin, sum hevur viðført betri virkandi arbeiðsmarknað og betri virkandi búskap sum heild.

Samstundis er trýstið á bústaðarmarknaðin í miðstaðarøkinum helst linkað, við tað at vágafólk, sum arbeiða í Havn, nú hava møguleika at flyta vestur aftur, tí Vágoyggin meira ella minni er vorðin partur av miðstaðarøkinum. Haraftrat hava fólk, sum høvdu ætlanir um at flyta til miðstaðarøki, nú betri umstøður at vera verandi í Vágunum.

Men upp í infrastrukturin rokna vit ikki bara vegir, undirsjóvartunnlar og líknandi, men eisini tey viðurskifti, sum Búskaparráðið legði stóran dent á í síni frágreiðing í fjør, nevniliga íbúðarmarknaðin, og ansingarmøguleikar bæði til børn og gomul. Búskaparráðið vísti á, at hesi viðurskifti hava stóran týdning fyri møguleikan hjá arbeiðsførum at hava atgongd til arbeiðsmarknaðin.

Hetta seinasta árið er rættiliga nógv hent á hesum økjunum. Skjøtul er settur á fleiri arbeiði, sum fara at bøta um hesi viðurskifti, einamest í Eysturoynni. Men eisini aðrastaðni í landinum er ferð komin á útbyggingina av undirstøðukervinum, eitt nú eru nógv barnaansingarpláss komin í Havnini seinastu tíðina. Tá hugsað verður um týdningin av møguleikanum fyri ansing fyri møguleikanum fyri atgongd til arbeiðsmarknaðin, og at fólk framhaldandi hava hug at flyta til Føroya um møguleiki er til tess, eru ov nógv ansingarpláss ein minni trupulleiki enn ov fá ansingarpláss.

Samstundis er tað sjálvandi týdningarmikið, at aðrar forðingar ikki verða settar upp, so hvørt sum infrastrukturin verður betri, til dømis forðingar frá fakfeløgum ella politiskar forðingar fyri flyting av arbeiðsmegi yvir í tær vinnur og til tey støð í landinum, har eftirspurningur er eftir henni.

Tað er sjálvsagt ein spurningur, í hvønn mun flutningur av arbeiðsmegi úr einari vinnu yvir í eina aðra letur seg gera vegna geografiska býtið av arbeiðsplássum í teim ymsu vinnugreinunum. Eru meginparturin av arbeiðsplássunum í eini bygd í einari einstakari vinnu ella enn verri í eini einstakari fyritøku, kann tað sjálvsagt vera sera tungt, um hóttafall er í tí vinnuni ella fyritøkan fer á húsagang, ikki bara fyri tey, sum missa arbeiði, men eisini fyri bygdina sum heild.

Men hetta eigur ikki at leiða til, at lív verður hildið í vinnuni ella fyritøkuni við almennari hjálp. At hava ein marknaðarbúskap, sum luttekur í altjóða arbeiðsbýtinum, er ikki uttan trupulleikar. Teir stoytir, sum raka búskapin, krevja tillagingar, og hesar tillagingar eru ikki altíð lættar at koma ígjøgnum. Men at royna at læsa vinnubygnaðin fastan fyri at halda upp á arbeiðspláss, sum tað ikki er marknaðarligt grundarlag undir, er ikki ein farbærur vegur. Heldur eigur framhaldandi at verða arbeitt fyri at gera forðingarnar fyri at taka arbeiði, har tað finst, so lítlar sum gjørligt. Serliga eiga allir partar at vera við í royndunum at minka um forðingarnar hjá teimum, sum vilja ella noyðast at finna sær arbeiði í øðrum vinnugreinum og aðrastaðni í landinum.

## Uppsparing, íløgur og gjaldsjavni

### Útboð og eftirspurningur

Ein annar sera týðandi marknaður er marknaðurin fyri kapital. Hesin marknaður er eitt sindur øðrvísi háttaður enn arbeiðsmarknaðurin við tað, at sum uppsparing er kapitalur ógvuliga mobilur og kann skjótt flytast, har hann gevur størst avkast. Í dag eru lutfalsliga fáar forðingar hjá føroyingum at flyta sína uppsparing har, hon gevur størst avkast, og hetta ger at føroyski marknaðurin fyri kapital er tætt knýttur at altjóða marknaðum fyri kapital, kanska serliga ES-marknaðin fyri kapital. Tí er rentan í Føroyum, t.e. marknaðarprísurin á kapitali, tætt knýtt at europeiska rentustøðnum umvegis donsku krónuna. Seinastu árini hevur rentustøðið verið sera lágt og er í løtuni tað lægsta í meira enn 40 ár.

Gjaldsjavnin er munurin millum samlaða uppsparing í Føroyum og innlendskar íløgur. Netto avlopið av uppsparing fer uttanlands, og kann sostatt avlesast sum avlop á gjaldsjavnanum (um vit eru netto innflytarar av uppsparing, sum verður brúkt til at fíggja íløgur í Føroyum, sæst hetta sum undirskot á gjaldsjavnanum). Í løtuni er nettoútboðið av kapitali í Føroyum positivt, so at føroyingar eru nettoútflytarar av kapitali, tað vil siga at avlop er á gjaldsjavnanum. Keypið av nýggju Norrønu fer tó at minka munandi um nettoútflutningin av kapitali í ár og fer møguliga at gera føroyingar til netto innflytarar av uppsparing í 2003. Um íløgurnar ikki knappliga økjast munandi, fer avlop aftur at vera á gjaldsjavnanum næsta ár, um enn tað ikki verður so stórt, sum tað hevur verið seinastu árini.

Vert er at leggja til merkis, at saldoin á gjaldsjavnanum í sær sjálvum sigur einki um, hvussu føroyski búskapurin hevur tað. Eitt stórt gjaldsjavnaavlop er í sær sjálvum hvørki gott ella ringt. Summir politikarar tykjast hava ein málsetning um, at avlop, og helst vaksandi avlop, skal vera á gjaldsjavnanum ár um ár. Hesin málsetningur eigur at vera sleptur sum skjótast, í fyrsta lagi tí tað ikki letur seg gera, og í øðrum lagi tí hann er til hindurs fyri skilagóðum búskaparpolitikki og harvið fyri vælferðina hjá borgarunum.

Hóast gjaldsjavnin í sær sjálvum ikki sigur so nógv um støðuna á kapitalmarknaðinum, so ber til við greining av uppsparingini og íløgunum hvør sær at gera sær metingar um, hvussu støðan er.

Líka síðan kreppuna í 90unum hevur samfelagsliga uppsparingin í Føroyum verið sera stór. Frá 1990 til 2000 øktist árliga uppsparingin úr 15% av tøku bruttotjóðarúrtøkuni upp í 28%. Yvir styttri tíðarskeið kunnu fleiri orsøkir vera til eina stóra uppsparing, sum verður flutt uttanlands heldur enn brúkt til at fíggja innlendskar íløgur. Ein orsøk kann vera uttanlandsskuld, sum skal afturrindast og tí krevur eitt gjaldsjavnaavlop. Fyrstu árini eftir skrædlið í 1992 var hetta galdandi í Føroyum, tí ovurstóra uttanlandsskuldin skuldi gjaldast aftur.

Men eisini eftir, at føroyingar eru blivnir nettoánarar mótvegis útheiminum, hevur uppsparingin verið sera stór. Hetta skyldast helst í fyrsta lagi betri ella verri grundaðar væntanir um hall á gjaldsjavnanum í framtíðini. Í fyrsta lagi er sannlíkt, at fólk framvegis hava kreppuna í bakhøvdinum og ikki vilja koma í eina støðu aftur, har neyðugt er at minka ógvusliga um nýtsluna. Tí vilja tey flestu hava eina stóra uppsparing. Í tann mun stóra uppsparingin stendst av einum ynski um at vera heilt vísur í, at ein ikki aftur kemur í eina støðu, har ikki ber til at fíggja eitt rímuligt nýtslustøði, antin gjøgnum uppsparing ella lánifígging, er uppsparingin helst ríkiliga stór. Føroyingar eiga nú út móti 40 prosentum av bruttotjóðarúrtøkuni í uppsparing uttanlands, og er hetta ein sera stór uppsparing.

Í øðrum lagi hava inntøkurnar hjá nógvum verið væl størri enn vanligt seinastu árini, og tí hava hesir borgarar og fyritøkur helst lagt upp fyri, at so stór framgongd ikki kann halda fram óendaligt. Tí verður lagt upp fyri hesum við at flyta uppsparing av landinum nú, ”so nakað er at standa ímóti við”. Uppsparingin er so plaserað í íløgur innan- og uttanlands alt eftir avkastið og vága. Ein so stór uppsparing kann tí vera tekin um, at fólk – vælgrundað ella ikki - vænta lutfalsliga verri tíðir í útflutningsvinnunum næstu árini.

Samstundis sum uppsparingin øktist ógvusliga frá 1990 og frameftir, minkaðu íløgurnar í samfelagnum niður í stórt sæð einki. Í 1993 vóru íløgurnar 3% av tøku bruttotjóðarúrtøkuni. Síðan tá eru íløgurnar, privatar og almennar samantaldar, vaksnar upp í umleið 23% av tøku bruttotjóðarúrtøkuni í 2000. Nógvar íløgur verða sostatt gjørdar, men tá hugsað verður um sera lága rentustøði og stóru inntøkuskapanina í Føroyum seinastu árini, má sigast at íløgurnar ikki hava verið ovurstórar, heldur tvørturímóti. Haraftrat má hugsast um, at í løtuni vera nógvar óvanliga stórar einstakar íløgur gjørdar. Í fjør var tað undirsjóvartunnilin sum kravdi nógva fígging, í ár eru tað serliga nýggja Norrøna og eisini nýggi Skálaberg, og næsta ár verða tað nýggja Suðuroyarskipið og Norðoyartunnilin sum fara við nógvari uppsparing.

Orsakað av at eftirspurningurin eftir kapitali til íløgur hevur verið og – burtursæð frá í ár - framvegis er væl minni enn útboðið av kapitali, er stórur partur av útboðnum av kapitali, t.e. uppsparingini, endaður í íløgum uttanlands, í høvuðsheitum í fíggjaríløgum, so sum láns- og partabrøv, í Danmark.

Hví uppsparingin verður plaserað í útlendskar íløgur heldur enn í Føroyum er ein áhugaverdur spurningur. Ein orsøk er, at eingin virðisbrævamarknaður er í Føroyum í løtuni, har partabrøv í føroyskum fyritøkum verða keypt og seld til væl defineraðar marknaðarprísir. Hetta ger tað trupult hjá uppspararum uttan neyvt innlit í tær einstøku fyritøkurnar at seta pening í føroysk partabrøv.

Ein onnur møgulig orsøk er, at tað ikki finnast nóg nógvar lokkandi íløgur í Føroyum til uppsparingina, soleiðis at stórur partur av uppsparingini fær størri avkast uttanlands. Men meira grundleggjandi spurningurin er so, hví lutfalsliga fáir lønandi íløgumøguleikar finnast í Føroyum. Tað er ein opin spurningur, hví so er, men so leingi íløgurnar eru væl minni enn uppsparingin fara vit at síggja stór avlop á gjaldsjavnanum. Hetta vísir, at heldur enn altíð at vera eitt positivt tekin kann eitt stórt gjaldsjavnaavlop vera eitt tekin um trupulleikar í búskaparliga umhvørvinum.

**Regluverkið um kapitalmarknaðin**

Ein týdningarmikil orsøk til avlopið á gjaldsjavnanum seinastu árini er politiskt skapta avlagingin av vinnubygnaðinum, sum viðførir lutfalsliga ov lítið av heimamarknaðarframleiðslu og lutfalsliga ov nógv av útflutningsframleiðslu. Seinastu nógvu árini hevur búskaparpolitikkurin tilskundað útflutningsframleiðslu og av tí sama samstundis arbeitt ímóti heimamarknaðarframleiðslu, grundað á búskaparliga ógrundaðar tankar um, at útflutningsframleiðsla er meira verd enn heimamarknaðarframleiðsla.

Vit framleiða tveir høvuðsbólkar av vørum og tænastum: alt virksemi, sum antin beinleiðis framleiðir valuta, t.e. øll útflutningsframleiðsla, ella framleiðir vørur og tænastur, sum vit annars høvdu verið noydd at brúkt valuta fyri at fingið hendur á, vera bólkað undir valutaframleiðslu. Øll framleiðsla, sum tað ikki ber til at keypa uttanlands, og sum vit tí eru noydd til sjálvi at framleiða, kalla vit heimamarknaðarframleiðslu.

Flestu heimamarknaðarvørur ber ikki til at goyma í longri tíð, so vit kunnu ganga út frá, at framleiðslan og nýtslan av heimamarknaðarvørum eru í javnvág ár um ár. Hetta merkir, at gjaldsjavnin er munurin millum føroyska valutaframleiðslu og nýtslu av valutavørum. Tí kunnu vit siga, at framleiðslan av valuta seinastu árini hevur verið væl størri enn nýtslan av valuta upp á beinleiðis nýtslu og íløgur innanlands.

Men sæð yvir eitt longri tíðarskeið vil samlaða nýtslan svara til samlaðu framleiðsluna, so nýtslan av valutavørum vil eisini svara til framleiðsluna av valutavørum. Framhaldandi gjaldsjavnaavlop merkir, at vit hvørt ár senda útlendingum vørur og tænastur til nýtslu fyri størri virði, enn teir senda okkum. Skilagóðir brúkarar vilja í longdini hava eina nýtslu, sum svarar til virðið av teirra framleiðslu. Tí er gjaldsjavnaavlopið eitt fyribrigdi, sum ikki fer at vara allar ævir. Vit kunnu vænta, at ein tillaging so líðandi fer at henda, har gjaldsjavnaavlopið minkar og helst hvørvur. At gjaldsjavnavlopið fer at hvørva er sostatt hvørki gott ella ringt í sær sjálvum, men bara ein avleiðing av tillaging yvir tíð av samlaðu nýtsluni til samlaðu framleiðsluna.

Politisk stýring av gjaldsjavnanum gjøgnum stýring av býtinum av framleiðsluni millum úflutningsframleiðslu og heimamarknaðarframleiðslu er tí ikki ynskilig. Tað einasta, sum kemur burtur úr, er at borgararnir fáa minni gagn burtur úr samlaðu framleiðsluni enn annars.

Ein líknandi orsøk, sum eisini kann forklára part av gjaldsjavnaavlopinum, er forðingarnar fyri innflutningi av kapitali. Meðan tað eru fáar forðingar hjá føroyskum borgarum og fyritøkum fyri at spjaða sínar íløgur millum vinnugreinir og lond, eru stórar forðingar fyri møguleikum hjá útlendingum at spjaða sín vága við at gera íløgur í føroyska fiski- og alivinnu.

Hesar forðingar gera, at færri útlendskar íløgur verða gjørdar, t.e. minni verður innflutt av kapitali, enn tað annars hevði verið. Hetta skaðar samlaðu framleiðsluna í landinum, bæði tí forðingar fyri kapitalinnflutningi kunnu forða fyri, at búskaparliga burðardygg framleiðsla yvirhøvur kemur í gongd, og tí at framleiðslan møguliga ikki verður so effektiv sum gjørligt. Henda handilsforðing er tí ikki bara til skaða fyri tey, sum vilja flyta kapital til Føroya, men eisini til skaða fyri effektiva nýtslu av teim møguleikum fyri framleiðslu, sum eru í føroyska búskapinum.

# Vøru- og tænastuframleiðsla

## Alivinna

### ILA

Ein stórur trupulleiki í løtuni er ILA-sjúkan, sum eftirhondini er staðfest í nærum øllum alibrúkum herheima. Minni fæst fyri ILA-fongdan fisk, og samstundis hækka útreiðslurnar munandi, tí slakti av fiskinum verður dikterað av sjúkuni og ikki av lønsemismetingum.

Ikki er líkt til at koppseting móti ILA fer at vera nøkur hjálp, í hvussu so er ikki í nærmastu framtíð. Enn finst einki koppingarevni til keyps. Haraftrat loyvir ES ikki slíka koppseting í løtuni, og ivasamt er, um og nær hetta verður broytt.

Tað er møguligt, at ILA kreppan er størri enn neyðugt vegna væntandi regulering. Ein sokallaður eksternalitetur er í útbreiðslu av sjúku, tað er at sjúka í einum alibrúki økir munandi um møguleikan fyri, at onnur alibrúk eisini verða smittað. Tað vil siga, at hvussu ansin ella óansin ein alari er, ávirkar sannlíkindi fyri, at aðrir alifirðir verða smittaðir. Hesum tekur tann einstaki alarin ikki hædd fyri í nóg stóran mun, og tí er neyðugt við serligari regulering fyri, at eftiransni skal vera nóg gott.

Tá hædd skal takast fyri eksternalitetum, eigur tað almenna avgerandi leiklutin. Tí mugu almennu regluverkini fyri, hvar alast kann, hvussu nógvum alarum er pláss fyri, hvussu nógv í mesta lagi kann setast út á fjørðin osfr. vera nógv neyvari og betur undirbygd.

### Alivinnan og konjukturgongdin

Tá metast skal um, hvussu gongdin í alivinnuni ávirkar samlaða samfelagsbúskapin, er týðandi at gera sær greitt, at rætta mátið fyri støddina av alivinnuni er, hvussu nógv prosent av bruttofaktorinntøkuni, samlað og býtt á løngjaldingar og kapitalavkast, vinnan stendur fyri. Tá metast skal um avleiðingarnar av einum hóttafalli í alivinnuni á konjukturgongdina er sjálvandi eisini neyðugt at taka hædd fyri, at fyritøkur, sum selja vørur og tænastur til alivinnuna, missa inntøkur í eini slíkari støðu. Men ofta hava fyritøkurnar, sum missa kundar í alivinnuni, møguleikar fyri at fáa aðrar kundar, um enn inntøkurnar sjálvandi minka nakað, tá bestu kundarnir hvørva, og teir næstbestu kundarnir verða teir bestu.

Í 2002 vóru lønargjaldingarnar hjá alivirkjum, smoltstøðum og kryvjivirkjum 161 milliónir krónur, sum vóru 2,7% av samlaðu lønargjaldingunum í samfelagnum (vera kryvjivirkini ikki tald við vóru lønargjaldingarnar 120 milliónir krónur). Frá januar til august í ár eru lønargjaldingarnar í alivinnuni minkaðar 17,1% sammett við sama tíðarskeið síðsta ár, úr 106 milliónum í fjør niður í 88 milliónir krónur januar til august í ár. Tá tvungna slaktið av sjúkuraktum laksi er liðugt kann væntast, at minkingin í lønargjaldingum í vinnuni verður enn størri. Hinvegin er alivinnan ein sera kapitalkrevjandi vinna, so um roknað verður við at avkastið í alivinnuni yvir longri tíðarskeið er nakað tað sama sum í øðrum vinnum, stendur alivinnan fyri nakað meira enn 2,7% av bruttofaktorinntøkuni ”vanlig” ár.

Restinntøkan í alivinnuni, t.e. samlaða avkastið til kapitalapparatið, var uppá umleið 27 milliónir krónur í 2002 og verður helst negativ í ár. Burtur av restinntøkuni skulu fyritøkurnar gjalda rentur upp á lán, tryggingargjøld osfr. Í fjør høvdu alivirkini sæð undir einum eitt samlað hall av rakstrinum upp á umleið 233 milliónir krónur, meðan samlaða úrslitið aftan á rentur var eitt hall upp upp á umleið 313 milliónir krónur.

Orsakað av longu framleiðslutíðini í alivinnuni er trupult at gera skjótar tillagingar í framleiðsluni. Í dag ganga vanliga 18 mánaðir í miðal, frá tí smolt verða sett út, til laksurin verður tikin. Sveiggini í rakstrarúrslitunum vera størri, tá ikki ber til skjótt at innrætta framleiðslustøðið eftir

marknaðarumstøðunum. Langa framleiðslutíðin setur tískil stór krøv til likviditetsstýring og ikki minst til eginpening.

Hóast alifyritøkurnar hava verið væl konsolideraðar, merkja undirskotini seinastu árini, at eginpeningurin er uppi hjá fleiri fyritøkum, og hesar fyritøkur eru í vanda fyri at fara av knóranum. Støðan er so hættislig hjá fleiri, at um ikki prísurin kemur upp um framleiðslukostnaðin skjótt ella nýggjur eginpeningur verður skotin inn í fyritøkurnar, fara helst fleiri alarar á húsagang tað næsta árið.

**Búskaparlig regluverk um alivinnuna**

Men framhaldandi er neyðugt at minnast til, at størru sveiggini í alivinnuni ikki í sær sjálvum eiga at vera avgerandi fyri langtíðar útlitini hjá vinnuni. Grundleggjandi búskaparligu mekanismurnar eru tær somu sum í øðrum vinnum.

Avkastið til framleiðslumiðlarnar er avgerandi fyri tí einstøku fyritøkuna. Kann ein fyritøka forrenta sína nýtslu av framleiðslumiðlum, t.e. arbeiðsmegi og kapitali, hevur hon lívsins rætt. Kann ein fyritøka ikki forrenta sína nýtslu av arbeiðsmegi og kapitali, hevur hon einki búskaparligt lívsgrundarlag, og framleiðslumiðlarnir eiga at vera fluttir í aðrar vinnur, sum kunnu forrenta nýtsluna.

Studningur, beinleiðis ella óbeinleiðis, eigur ikki at vera latin. Ein alifyritøka er ein fyritøka sum allar aðrar og eigur ikki at vera viðfarin øðrvísi. Hetta tykjast tey, sum luttaka í vinnuni eisini at vera samd í, men eitt uppskot hevur verið frammi um sokallað ”carry back” til alivinnuna. Hetta er afturbering av goldnum skatti árini fyri, um ein alifyritøka hevur undirskot eitt ár ella fleiri.

Um ”carry back” skipanin verður innførd fyri alivinnuna, men ikki fyri allar aðrar vinnur, er skipanin líka nógv studningur sum nakað annað og eigur ikki at koma upp á tal. Hvørjar sømdir alivinnan fær ella ikki fær í øðrum londum er óviðkomandi. Tað avgerandi eru regluverkini um føroysku alivinnuna samanborið við regluverkini um aðrar vinnur í Føroyum. Alivinnan eigur ikki at fáa sømdir fram um aðrar vinnur í Føroyum, líkamikið hvussu onnur lond velja at skipa síni viðurskifti.

Hetta merkir samstundis, at forðingarnar fyri útlendskum kapitali eiga at verða avtiknar. Eingin orsøk er til at halda útlendskar íleggjarar uttanfyri alivinnuna. Eru myndugleikarnir bangnir fyri, at útlendskar fyritøkur keypa føroyskar alifyritøkur av ”strategiskum” orsøkum (eitt nú fyri at niðurleggja virksemið), ber til forða fyri hesum á annan hátt. Til dømis við serligum ásetingum í sjálvum aliloyvinum. At steingja fyri útlendskum íløgum í føroysku alivinnuna er í øllum førum ein vánalig loysn.

Ognarrætturin til firðirnar eigur at vera brúktur á rættan hátt. Tað vil siga at firðirnir eiga at vera viðfarnir av upprunaeigaranum sum einhvør annar framleiðslumiðil. Tí eigur tað almenna at krevja leigu fyri brúksrætt til ein fjørð, á sama hátt sum ein húsaeigari, ið útleigar síni hús, krevur leigugjald frá leigaranum fyri brúksrættin til húsini. Ein upplagdur møguleiki er at skeita til skipanina viðvíkjandi tilfeingisgjaldi, sum er galdandi fyri oljuvinnuna, tá uppkrav av leiguni í praksis verður innførd.

Ein tílík skipan hevði eisini í stóran mun loyst politiska trupulleikan um veðhald í aliloyvum. Upphæddin, sum eitt aliloyvið verður selt fyri, og sum fíggingarstovnarnir vilja hava veðhald í, um teir skulu lata lán til keyp av slíkum, er væntaða nútíðarvirði á tilfeingisrentuni, sum fjørðurin inniheldur. Um landið leypandi uppkravdi tilfeingisrentuna, heldur enn at lata aliloyvini fyri einki, og soleiðis lata tilfeingisrentuna verða innihildna í aliloyvinum, hevði eitt aliloyvi ikki verið ein

gáva til útvaldar persónar. Tá hevði spurningurin um veðhald í aliloyvum mist sín politiska týdning, og blivið ein spurningur um, hvat er mest praktiskt fyri raksturin av vinnuni.

## Fiskavirking

### Fiskavirking í framtíðini

Umstøðurnar hjá vinnulívinum broytast framhaldandi. Ein vinna, har stórar broytingar fara fram í løtuni, er fiskavirking. Sum ein vinna, sum í løtuni er sera útsett fyri kapping frá fyritøkum í láglønarlondum, stendur fiskavirking í Føroyum yvir fyri stórum avbjóðingum komandi tíðina. Ein grundleggjandi spurningur er, í hvønn mun nøkur framtíð er fyri fiskavirking í Føroyum í verandi líki.

Í dag er mest sum øll fiskavirkisframleiðsla í Føroyum vanlig ídnaðarframleiðsla, sum at kalla bara krevur vitan og tøkni, sum framleiðarar í øðrum londum lættliga kunnu ogna sær. Vegna kapping frá virkjum í láglønarlondum er marginin í fiskavirking við at verða pressað so langt niður, at skiftisavlopið er við at hvørva í hálønarlondum.

Henda kapping verður bara harðari komandi árini. Sum frálíður fara føroysku fiskavirkini tí helst ikki at klára at kappast við aðrar vinnugreinar í Føroyum um ófaklærdu arbeiðsmegina. Hóast nógv tiltøk frá almennari síðu fyri at gera fiskavirkini kappingarfør við aðrar vinnugreinir í Føroyum um arbeiðsmegina, er fiskaframleiðsla, ið krevur munandi nøgdir av ófaklærdari arbeiðsmegi, tí helst uttan framtíð í Føroyum.

Hetta skal ikki skiljast sum at fiskavirking í Føroyum neyðturviliga fer at hvørva innan fyri tey næstu fáu árini. Men fiskavirking sum arbeiðspláss hjá ófaklærdum føroyingum fer uttan iva at minka munandi og kanska hvørva heilt tey næstu 10 til 15 árini.

Skal fiskavirking laga seg til hesar broytingar í umstøðunum, til dømis við at automatiserað framleiðsluna ella við at leggja seg eftir at framleiða spesialiseraðar vørur, verður helst neyðugt við stórum íløgum í vinnuna komandi árini. Ein stór forðing fyri, at íleggjarar vilja seta pening í eina endurnýgging av fiskivinnuni á landi, er politiski óstabiliteturin á økinum, sum ger umhvørvi hjá vinnuni meira óstøðugt enn neyðugt. Nógva politiska uppíblandingin kemst helst júst av, at drívmegin í fiskivinnuni, eins og í flestu øðrum vinnum gongur ímóti framhaldandi effektivisering. Hetta er í andsøgn við politiska ynski um, at so nógv fólk sum gjørligt skulu arbeiða í fiskivinnuni. Hetta ynski er tí ein beinleiðis forðing fyri framhaldandi effektiviseringum í flakavinnuni.

Eitt dømi um verjutiltak fyri fiskavirkir er fiskavirkisskipanin í ALS. Henda skipanin var upprunaliga ætlað at hjálpa fiskavirkjunum at halda upp á arbeiðsmegina, tá lítið av virksemi er, tí skipini ikki fáa fiskað fyri veðri. Í dag er hon ein kappingaravlagandi skipan til fyrimuns fyri fiskavirki, sum virka fisk, tá møguleiki er fyri vinningi og síðan leggja brakk og lata fiskavirkisskipanina taka um endan, tá líkindini ikki eru so góð. Tað vil siga, at ikki bara er skipanin avlagandi fyri kappingina um arbeiðsmegina millum fiskavirkir og aðrar fyritøkur, men haraftrat avlagar skipanin eisini kappingini innanhýsis millum fiskavirkini, móti teimum virkjum, sum royna at hava støðugt virksemi.

Onnur dømi um verjutiltøk fyri fiskavirking á landi eru forboðið móti at virka fiskin umborð á skipunum, stuðulin til flyting av fiski og nú helst eisini eitt krav um at allur fiskur, fiskaður undir Føroyum, skal landast í Føroyum. Eins og er galdandi fyri fiskavirkisskipanina, eru hesi tiltøkini kappingaravlagandi og eiga tí at vera avtikin.

Grundleggjandi eigur politikkurin at vera, at heldur enn at royna at fasthalda fiskavirkjunum í einum ávísum bygnaði við verjutiltøkum av ymsum slag, eigur vinnan at sleppa at laga seg til broytingarnar í umstøðunum undir fríum marknaðartreytum. Bara á henda hátt fáa vit eina sterka

fiskivinnu á landi, sum ikki knappliga ein dag finnur útav, at hon ikki er innrættað til marknaðarbúskaparliga veruleikan og ikki stendur til at bjarga.

## Fiskiskapur

### Búskaparlig regluverk um fiskivinnuna

Sum fyrisitari av føroyska fiskatilfeinginum fyri almenningin er sjálvsagt, at tað almenna eigur at hava ein stóran leiklut í at skapa karmar fyri fiskivinnuna. Men núverandi regluverk um fiskiskap, ið leggur nógvar avgerðir, um hvør sleppur at fiska, nær, hvar og hvussu, til landsstýrismannin at taka, er til stóran ampa fyri búskaparliga effektivitetin í fiskivinnuni. Heldur eigur vinnan sjálv í størstan mun at taka hesar avgerðirnar á marknaðarbúskaparligum grundarlag.

At politisk og fyrisitingarlig stýring heldur enn prísmekanismuna virkar sum stýringsamboð ger, at fiskivinnan er meira stirvin og minni effektiv, enn hon annars hevði verið. Lítið er at taka seg aftur í, at hetta er ein stórur strukturtrupulleiki í føroyska búskapinum. Búskaparráðið hevur tískil ferð eftir ferð víst á, at fyri at fáa røttu framdriftina og effektivitetin í fiskiskap er avgerandi neyðugt, at sentralir partar av núverandi skipan verður avloystir av marknaðarstýring av fiskiskapinum.

Mest grundleggjandi fortreytin fyri størri marknaðarstýring av fiskiskapinum er, at tillutingin av fiskinum í sjónum fer fram gjøgnum ein marknað, soleiðis at reiðaríini gjalda marknaðarprís fyri tilfeingi. Uppskotið hjá Búskaparráðnum, ið var lagt fram í várfrágreiðingini frá 2000, um uppboðssølu av fiskidøgum er ein roynd at vísa á eitt dømi um, hvussu ein tílíkur marknaður kann síggja út.

Uppskotið byggir á eina staðfesting av, at fyri at fáa ein vælvirkandi marknað fyri tilfeingi í sjónum er neyðugt at: 1. Ognarrætturin til tilfeingi í sjónum er greitt staðfestur, soleiðis at greitt er, hvør hevur rætt til at selja atgongdina til tilfeingi, 2. Líka atgongd er fyri allar føroyingar til at bjóða upp á atgongdina til tilfeingi, sum verður seld á marknaðinum, soleiðis at øll keypa frá sama stað, heldur enn at summi mugu keypa frá øðrum, sum fáa atgongdina til tilfeingi ókeypis, 3. So løtt atgongd sum gjørligt er til marknaðin fyri atgongd til tilfeingi, soleiðis at so nógv sum gjørligt hava møguleika fyri at bjóða upp á fiskidagar 4. Frí umsetiligheit er innanfyri skipanina, t.e. loyvt er at selja keypt tilfeingi víðari.

Ein annar partur av búskaparliga regluverkinum um fiskivinnuna er serligi skattalættin hjá sjómonnum. Hesin er fyri Búskaparráðið ein spurningur um, at hann avlagar vinnubygnaðin í Føroyum. Annars átti tað at verið sjálvsagt, at spurningurin um, hvørja løn sjómenn skulu hava, er eitt mál millum sjómenn og reiðarí, sum tað almenna ikki eigur at blanda seg í við serligum skattalættum og øðrum serskipanum.

Við serskipanini fyri sjómenn skeiklar tað almenna kappingina millum ymsu vinnurnar í Føroyum um arbeiðsmegi soleiðis, at býtið av arbeiðsmegini millum vinnurnar verður eitt annað, enn marknaðaravkastið í teim ymsu vinnunum gevur grundarlag fyri. Serligi skattalættin til sjómenn ger náttúrliga munin í lønini eftir skatt millum sjómenn og flest allar aðrar arbeiðstakarar kunstiga stóran. Hetta førir til at meira arbeiðsmegi enn annars leitar yvir móti fiskiskapi. Yvir tíð vil hetta gera, at lønin í fiskiskapi áðrenn skatt verður lægri, enn hon annars hevði verið. Kunstiga stóra útboðið av arbeiðsmegi í fiskiskapi vil sostatt gera, at arbeiðsgevararnir í fiskivinnuni sleppa bíligari, enn teir annars høvdu gjørt, og teir eftirspyrja tí meira arbeiðsmegi enn annars.

Vánaliga innrættingin av regluverkunum um fiskivinnuna ger sostatt, at meira arbeiðsmegi enn neyðugt fer til at fáa fiskin upp úr sjónum. Av tí sama verður lutfalsliga minni av arbeiðsmegi til taks í øllum øðrum vinnum, og hetta trýstir lønina, sum allir aðrir arbeiðsgevarar mugu gjalda fyri arbeiðsmegina, upp.

Tað er týdningarmikið at vera greiður yvir, at orsøkin, til at arbeiðsgevarar í fiskivinnuni sæð yvir longri tíðarskeið fáa arbeiðsmegina bíligari enn annars, er, at skattliga viðgerðin av sjófólki er øðrvísi enn fyri aðrar arbeiðstakarar. Um allir arbeiðstakarar fingu sama skattalætta sum sjófólk, hevði kunstigi munurin í lønini eftir skatt millum arbeiðstakarabólkarnar horvið. Tá høvdu arbeiðsgevararnir í fiskiskapi verði noyddir til at hækka lønina í mun til lønarlagið aðrastaðni í búskapinum fyri at halda upp á arbeiðsmegina. Um skattatrýstið er 45% ella 25% er í hesum sambandi líkamikið, so leingi skattatrýstið er eins fyri arbeiðstakarar, sum hava eins stóra løn. Hvat fólk krevja í løn avhongur ikki av, hvussu nógv tey rinda í skatti, men av hvussu nógv, tey hava møguleika fyri at fáa í løn aðrastaðni.

Áðrenn sjómenn vera skattaðir eftir somu reglum, sum allir aðrir arbeiðstakarar í samfelagnum, hava vit sostatt ikki studningsfría fiskivinnu. Samstundis er vert at minnast til, at studningarnir til fiskivinnuna gera, at skattatrýstið á øll onnur í samfelagnum er hægri enn neyðugt.

# Tað almenna

## Tað almenna og konjukturpolitikkur

Tað er ógjørligt at meta neyvt um gongdina í teim óstabilu útflutningsvinnunum eitt ár fram í tíðina. Av tí at flestu og størstu sveiggj í konjukturgongdini koma frá stoytum til prísir og nøgdir í útflutningsvinnunum er ógvuliga trupult at føra miðvísan konjukturjavnandi fíggjarpolitikk í Føroyum. Men sjálvvirkandi konjukturjavnandi mekanismur eru innbygdir í almennu skipanina. Um til dømis inntøkuskapanin í útflutningsvinnuni minkar, minka skattgjaldingarnar haðani eisini, soleiðis at inntøkan eftir skatt minkar ikki líka nógv. Eisini hevur ALS eina konjukturjavnandi ávirkan, tí um inntøkuskapanin minkar, minka inngjaldini til ALS, meðan útgjaldini økjast.

Tað er avgerandi neyðugt, at politikararnir ikki stara seg blindar upp á botnlinjuna á fíggjarlógini. Málsetningurin um at tað almenna skal hava eitt støðugt vaksandi yvirskot eisini í slakari tíðum er ikki skilagóður og eigur ikki at vera leiðbeinandi fyri fíggjarpolitikkin. Heldur enn at vera við til at økja um sveiggini í búskapinum, eigur tað almenna at hava konjukturjavnandi ávirkan. Størsta konjukturjavnandi ávirkan frá tí almenna er ein støðug almenn nýtsla. Ein niðurgongd í búskapinum, sum stendst av at eftirspurningurin uttanífrá svíkur eitt tíðarskeið, skal avbøtast, um ikki við aktivum fíggjarpolitikki, so við støðugari kós. Niðurgongdin skal ikki gerast størri enn neyðugt, við at eftirspurningurin frá tí almenna eisini minkar.

Seinastu tíðina eru politisk tekin komin um, at henda konjukturjavnandi ávirkan av tí almenna skal minkast. Sitandi samgonga hevur sett sær mál um støðugt vaksandi avlop á fíggjarlógini. Hetta merkir, at heldur enn at hava tað almenna sum eina stabiliserandi ávirkan á konjukturin skal almenna nýtslan sveiggja í takt við inntøkurnar. Men hetta fer at gera sveiggini í samlaða eftirspurninginum í búskapinum enn størri, og fer tí eisini at gera samlaða eftirspurningin eftir arbeiðsmegi meira óstøðugan.

Í hesum sambandi er eisini neyðugt at gera greitt, at um tað almenna ger íløgur í undirstøðukervi, tað verið seg undirsjóvartunlar ella samskiftisnet, ella í útlendsk lánsbrøv, eigur at vera avgjørt út frá, hvør íløga gevur størri samfelagsligt avkast. Verður mett, at til dømis ein undirsjóvartunnil til Norðoyggjar er ein skilagóð íløga, so eigur tað almenna ikki at vera bangið fyri at lánsfíggja íløguna. Ikki at fremja eina íløgu, bara orsakað av einum ynski um at hava eitt ávíst avlop á fíggjarlógini, er ikki skilagóður búskaparpolitikkur, serliga ikki tá tað almenna sum heild er væl fyri fíggjarliga.

At hall møguliga verður á fíggjarlógini og gjaldsjavnaavlopið minkar er óviðkomandi í hesum sambandi. Fíggjarlógin kann ikki samanberast við roknskapin hjá eini fyritøku og má tí ikki skiljast á sama hátt. Ein fyritøka má alla tíðina innrættað seg eftir teim viðurskiftum, sum eru á tí marknað fyritøkan arbeiðir á, tí fyritøkan kann ikki liva við undirskoti fleiri ár á rað. Tað almenna arbeiðir ikki undir somu treytum. Eingin meining er í at royna at hava avlop hvørt ár, tí tað almenna er ikki ein fyritøka, sum skal geva avkast til íleggjarar. Einasta treyt er, at tað almenna er ført fyri at fíggja sína nýtslu, t.e. tað er ta framleiðslu, føroyingar í felag brúka upp á seg sjálvar.

Sjálvsagt er neyðugt at tryggja sær, at almenna skuldin ikki verður ov stór, soleiðis at tað almenna fær trupulleikar við kredittvirðinum. Men so leingi kredittvirði er í lagi, ger tað einki um hall og avlop eru hvørt um annað. Hvussu stór skuldin kann verða, áðrenn kredittvirðið versnar munandi, finst einki greitt svar uppá. Kredittvirðið hjá einum samfelag avhongur í síðsta enda av, hvussu stóra skuld kreditorarnar meta, at samfelagið *vil* gjalda aftur. Hesar metingar avhanga so aftur av, hvussu nógv kreditorarnir halda, at landið *er ført fyri* at gjalda aftur, hvussu tey grundleggjandi búskaparviðurskiftini í landinum eru, hvussu politisku regluverkini, sum skulu tryggja, at samfelagið afturrindar skuld, eru skipað, osfr. Til dømis er eingin ivi um, at føroyski búskapurin,

sum hann er innrættaður í dag, kann bera eina størri almenna skuld, enn føroyski búskapurin fyri 15 árum síðan kundi.

**Støddin á almenna sektorinum**

Viðvíkjandi vøkstrinum í almennu útreiðslunum seinastu árini er neyðugt at skilja ímillum fíggjarpolitikk, sum er ein roynd at regulera samlaða eftirspurningin í samfelagnum, og útbygging av almenna sektorinum, sum er ein spurningur um, hvørjar vørur og tænastur politikarar og borgarar vilja hava og eisini partvís, hvørt tær skulu framleiðast av tí privata ella tí almenna.

Vøksturin í almennu útreiðslunum seinastu árini hevur sum so einki við fíggjarpolitikk at gera, men er eitt úrslit av teim krøvum til tænastur, sum politikarar og borgarar seta til tað almenna. Hvørt almenni sektorurin er vorðin ov stórur ella ikki hevur tí ikki so nógv við konjukturgongdina at gera, men er í størstan mun ein politiskur spurningur um, hvat fyri tænastur politikarar og borgarar vilja hava, at tað almenna framleiðir.

Málsetningurin hjá samgonguni um at tað almenna skal minkað 1 prosent næsta ár er tí meira ein ideologiskur spurningur, sum ikki hevur so nógv við konjukturstýring at gera. Sjálvsagt merkir ein minni almennur sektorur, at konjukturjavnandi ávirkanin av støðugari almennum eftirspurningi verður minni. Men tann veruleiki, at almenna nýtslan í Føroyum sum partur av BTÚ liggur sera nær tí vit síggja í hinum Norðurlondunum, ber boð um, at tað helst er avmarkað, hvussu nógv borgararnir vilja loyva, at almenna nýtslan verður minkað.

**Ríkisveitingin**

Málsetningurin um at minka almenna sektorin hevur helst eisini samband við skerjingina í ríkisveitingini. Ríkisveitingin varð skerd 367 milliónir krónur í 2002 og vera tí væntandi færri valutaveitingar komandi árini enn árini frammanundan.

Vit hava kortini havt avlop í viðskiftunum við umheimin í 2002, og í 2003 verður heldur ikki munandi hall hóast minni ríkisveiting. Tá skip verða tald uppí, verður helst javnvág í viðskiftunum við umheimin í ár.

Hetta boðar frá, at búskapurin kann tillagað seg minkingina av ríkisveitingini upp á 367 milliónir krónur uttan umfatandi bygnaðarbroytingar. Í fyrstu atløgu ávirkast nýtslan ikki uttan í tann mun, borgararnir ikki tóku hædd fyri, at ríkisveitingin fór at verða minkað, longu áðrenn minkingin var framd. Tað vil siga at í fyrstu atløgu merkist minkingin í ríkisveitingini í mestan mun við at gjaldsjavnaavlopið minkar, heldur enn at nýtslan minkar.

Men búskapurin fer sum frálíður at fáa eitt annað skap, enn hann hevði fingið, um ríkisveitingin ikki varð minkað, tí nakað av tillaging skal til. Minkingin fer at merkja, at tað sum frálíður ikki vera ráð til nøkur ting, sum tað annars hevði verið ráð til.

Ríkisveitingin er í fyrsta lagi ein valutaveiting til føroyska samfelagið. Tá hendan minkar skal alt samfelagið innrættast eftir, at valutaveitingarnar eru minkaðar. Í øðrum lagi er tað soleiðis, at av tí at ríkisveitingin verður latin landskassanum, og tað almenna er innrættað hareftir, má tað almenna laga seg til, at inntøkurnar frá hesi keldu minkað, við at minka um útreiðslurnar og/ella við at økja inntøkurnar aðrastaðni frá. Tí verður serligt trýst á tað almenna at laga seg til minni ríkisveiting.

Fyri at minkingin í ríkisveitingini skal merkja vælferðina hjá borgarunum minst møguligt framyvir krevst, at skilagott verður borið at. Fyrst og fremst er neyðugt, at allar vinnuligar íløgur og allur vinnuligur rakstur eru grundað á marknaðarlig kor. Hetta er neyðugt, fyri at vinnuligu avgerðirnar ikki skulu vera villeiddar av almennum verjutiltøkum, kapitalstudningum ella rakstrarstudningum.

Skal ríkisveitingin skerjast enn meira, gerst skilagóður vinnupolitikkur enn meira átroðkandi. Haraftrat gerst helst eisini neyðugt at minka almennu útreiðslurnar, bæði tænasturnar og sosiala útjavningarpolitikkin. Tað er ikki trúligt, at tað almenna í fullan mun kann fáa inntøkurnar um skattin til at varðveita verandi útreiðslustig.